# Álit við tilmæli um samsýning og eftirløn til løgtingsfólk



**Februar 2024**

**INNIHALDSYVIRLIT**


| | | |
|---|---|---|
| 1 | Inngangur | 2 |
| 2 | Samandráttur | 4 |
| 3 | Verandi skipan í Føroyum | 7 |
| 4 | Skipanin í grannalondum okkara | 14 |
| 4.1 | Grønland | 14 |
| 4.2 | Ísland | 16 |
| 4.3 | Danmark | 18 |
| 4.4 | Noreg | 23 |
| 5 | Lønarlagið í føroyska samfelagnum | 28 |
| 6 | Viðgerð og tilmæli | 31 |
| 7 | Keldulisti | 45 |

# 1 Inngangur

Løgtingsforkvinnan hevur í skrivi, dagfest 24. oktober 2023, tilnevnt Jógvan Amonsson, Gunn Ellefsen, advokat, og Mariu á Dul at manna nevnd at endurskoða løgtingslóg um samsýning og eftirløn løgtingsmanna. Tað eru somu persónar, sum gjørdu tilmælið um samsýning og eftirløn løgtingsmanna frá 8. juni 2018.

Nevndin skipaði seg á fyrsta fundi við Jógvani Amonsson sum formanni.

## 1.1 Arbeiðssetningur

Endamálið við arbeiðnum er at tryggja formansskapinum í Løgtinginum eitt dygt og væl grundað tilmæli um samsýningar og eftirløn til tingfólk, og skal nevndin sambært arbeiðssetninginum í sínum tilmæli taka atlit at:

- Lønarlagnum í landinum yvirhøvur.
- Tí tign og ábyrgd, sum liggur í tingsessinum.
- Hvussu tingfólk í grannalondum okkara verða lønt, og hvørjar sømdir tey annars hava.
- Onnur viðkomandi viðurskifti.

## 1.2 Innsavning av upplýsingum og allýsingar

Vit hava valt at brúka sama leist, sum varð brúktur til álitið frá 8. juni 2018, ið eisini er tann leisturin, sum tær nevndir, sum hava viðgjørt samsýningar og eftirlønir hjá landsstýrisfólkum v.m., hava brúkt.

Vit hava savnað upplýsingar frá teim norðurlondum, sum sammetingar fyrr hava verið gjørdar við, tá viðurskifti hjá m.ø. landsstýrisfólkum v.m. hava verið viðgjørd.

Viðurskiftini hjá løgtingsfólkum eru lýst og verða samanlíknað við viðurskiftini í teim norðurlondum, sum vit hava valt at fáa upplýsingar frá, og harumframt eru upplýsingar fingnar til vega um lønarlagið í landinum yvirhøvur. Lønartøl eru, alt tað ber til, lýst í 2023 tølum, hóast vit í Føroyum kenna tølini fyri 2024. Hetta fyri at tølini kunnu vera so samanberilig sum til ber.

Í innsavningini er komið fram, at hugtakið eftirløn, sum vanliga verður brúkt í Føroyum um uppsparing til ellisár, í teimum londunum vit samanlíkna okkum við, verður kallað pensjón, og at eftirlønarhugtakið, har tað finst, er ein styttri varandi veiting. Havandi í huga, at pensjónsnýskipanin nýtir hugtakið “pensjón” og ikki “eftirløn”, hava vit valt at brúka orðið “pensjón” allastaðni, har talan er um uppsparing ella innvinning til ellisár, eisini um tey føroysku viðurskiftini, har lógin um samsýning og eftirløn ikki beinleiðis er endurgivin.

## 1.3 Bygnaðurin í álitinum

Í parti 2 verða nevnd tey høvuðsatlit, sum vit hava lagt dent á í okkara arbeiði, og síðani verður tikið samanum tilmælini.

Í parti 3 lýsa vit verandi samsýningarskipan v.m. fyri løgtingsfólk og varafólk sundurgreinað í lønarsamsýning, kostnaðarískoyti og kostnaðarendurgjald, ferðaútreiðslur, samskiftisútreiðslur, fráfaringarsamsýning (bíðiløn), pensjónsviðurskifti og viðurskifti við deyða og aðrar starvsreglur.

Í parti 4 lýsa vit skipanir í grannalondunum Grønlandi, Íslandi, Danmark og Noregi.

Í parti 5 lýsa vit lønarlagið í Føroyum fyri størv, sum frægast kunnu samanberast í tign og ábyrgd.

Í parti 6 verða tær einstøku ásetingarnar í verandi samsýningarskipan viðgjørdar. Fyrst verður tikið samanum, hvussu skipanin er í dag, síðani verða fyrimunir og vansar viðgjørdir og samanbornir við aðrar samanberiligar skipanir bæði í Føroyum og í grannalondunum, sum vit hava valt at samanbera við, við tí endamáli at koma við tilmælum um, hvussu samsýningarskipanin eftir okkara tykki í framtíðini eigur at verða sett saman.

Tórshavn, tann 16. februar 2024

Jógvan Amonsson | Maria á Dul | Gunn Ellefsen

# 2 Samandráttur

## 2.1 Høvuðsatlit

Nevndin hevur í arbeiði sínum lagt dent á at koma við einum áliti, har tað gjøgnumgangandi er tilráðing um meira gjøgnumskygni í skipanini, ið er berandi og afturvendandi atlitið. Við støði í teimum skipanum, ið eru galdandi í samfelagnum annars og í grannalondum okkara, mælir nevndin til, at skipanin við samsýning og eftirløn/pensjón til løgtingsfólk verður tillagað nútíðar-samfelagnum.

Miðað er eftir at fáa eina einfalda samsýningarskipan, sum í bygnaði og støði kann samanberast við líknandi setanarviðurskifti hjá øðrum viðkomandi fakbólkum. Hendan skal eisini, so vítt gjørligt, vera í tráð við gongdina í hinum Norðurlondunum, ið nevndin hevur samanborið seg við, hvat viðvíkur samsýningum til tingfólk.

## 2.2 Tilmæli

Í høvuðsheitum mælir nevndin til, at hesar broytingar verða gjørdar viðvíkjandi samsýningini og pensjónini hjá løgtingsfólkum:

- Lønartalvan hjá Felagnum Tænastumonnum Landsins skal framvegis vera grundarlagið undir lønarsamsýningini.
- Lønarsamsýningin hjá løgtingsfólkum verður hækkað úr lønarflokki 34 (kr. 46.375 tann 1. oktober 2023 um mánaðin) til lønarflokk 36 (kr. 53.058 tann 1. oktober 2023 um mánaðin) hjá tænastumonnum landsins. Í fylgiskjali 3 er lønartalvan hjá Felagnum Tænastumonnum Landsins galdandi frá 1. oktober 2023 til 30. september 2024 víst.
- Skattafría kostnaðarískoytið (kr. 2.000 um mánaðin) verður strikað.
- Tingfólk fáa útflýggjað eina hóskandi teldu og eina fartelefon til løgtingsarbeiðið og fáa goldið telefonnýtslu sína, meðan tey hava sæti á tingi.
- Fráfaringarsamsýningartíðarskeiðið hjá løgtingsfólki verður broytt frá at verða í minsta lagi 4 mðr. og í mesta lagi 6 mðr. til at verða í minsta lagi 3 mðr. og í mesta lagi 6 mðr.
- Varafólk, sum hava havt sæti á tingi í meira enn seks mánaðir samanlagt í einum valskeiði og framvegis sita á tingi 2 mánaðir áðrenn nýval, fáa fráfaringarsamsýning svarandi til 1 dag fyri hvørjar 8 dagar, viðkomandi hevur tikið sæti á tingi, tó í minsta lagi 1 mánað og í mesta lagi í 6 mánaðir.
- Varafólk, sum hava havt sæti á tingi samanhangandi í eitt ár ella meiri í einum valskeiði, fáa, um tey missa sæti, fráfaringarsamsýning í 1 dag fyri hvørjar 8 dagar viðkomandi hevur tikið sæta á tingi, tó í mesta lagi 6 mánaðir.
- Tað verður farið frá einari skipan við ongari mótrokning í fráfaringarsamsýningini, til at mótroknað verður í fráfaringarsamsýningini í teimum førum, har tingfólk og varafólk hava aðra lønarinntøku í fráfaringartíðarskeiðinum, soleiðis at tað almenna bert skal gjalda møguliga munin upp til ásettu fráfaringarsamsýningina.

- Verandi pensjónsskipan verður broytt, soleiðis at farið verður frá verandi skipan við tænastumannapensjón til eina skipan, har landið rindar 15% av lønarsamsýningini hjá tingfólkum í eina góðkenda pensjónsskipan. Í hesum sambandi verður sama skiftisskipan nýtt, sum verður nýtt fyri landsstýrisfólkini í sambandi við, at tey eru farin frá at vinna sær tænastumannapensjón til, at landið rindar 15% av lønarsamsýning teirra í eina góðkenda pensjónsskipan.[1]
- Lønarsamsýningar og fráfaringarsamsýningar fara frá at verða goldnar forút til at verða goldnar afturút frá næsta løgtingsvali.
- Treytirnar viðvíkjandi fráfaringarsamsýningini hjá løgtingsforfólkum verða tær somu sum tær viðvíkjandi fráfaringarsamsýningini hjá løgmanni.
- Lógin um samsýning og eftirløn landsstýrismanna v.m. verður broytt, soleiðis at løgtingsforfólkið í øllum lutum er javnsett við løgmann og ikki bara í mun til samsýning.
- Lógin frá 2003 um nevnd at geva løgmanni tilmæli um samsýning og eftirløn landsstýrismanna v.m. verður víðkað til eisini at umfata at geva løgtingsforfólkinum tilmæli um samsýning og eftirløn løgtingsmanna.
- Eftirlønaraldurin hjá løgtingsfólkum er tann sami sum er galdandi sambært lóg um almannapensjónir o.a.

Nevndin mælir til, at allar broytingar verða settar í verk í einum aftaná næsta val sum ein samlað loysn.

Hetta merkir samstundis, at nevndin mælir frá, at ávís tilmæli verða fylgd og onnur ikki, tí tá er vandi fyri, at ótilætlaðir skeivleikar koma í.

## Avleiðingar av at seta tilmælini í verk

Neyðugar tillagingar mugu gerast í viðkomandi lóggávu.

Eftir galdandi reglum hevur løgtingsfólk rætt til pensjón, tá ið viðkomandi hevur sitið á løgtingi í minsta lagi 1 ár. Rætturin til fulla pensjón verður vunnin eftir 16 árum á løgtingi, og er hægsta pensjónin 60 % av eftirlønargevandi lønini í tí lønarflokki, sum løgtingsfólk er lønt eftir, tá ið viðkomandi fer úr starvi. Skipanin byggir á grundreglurnar í skipanini fyri tænastumenn, har tænastumenn tó skulu vera í starvi í 37 ár fyri at vinna sær fullan pensjónsrætt.

Nevndin metir, at fyritreytirnar og grundgevingarnar, ið verandi skipan er bygd á, eru broyttar munandi. Somuleiðis metir nevndin ikki, at tað er skynsamt, at tað almenna við verandi skipan

[1] Sí fylgiskjal 2

átekur sær kostnaðarmiklar framtíðarskyldur mótvegis borgarum, hvørs virðið ikki er gjøgnumskygt og kent, og har virðið ikki samsvarar við pensjónskipanir- og pensjónsstøðið í samfelagnum annars.

Skiftisskipan má gerast fyri tingfólk, sum hava vunnið sær rættindi eftir verandi pensjónsskipan.

Samlaðu broytingarnar fara at hava við sær, at skipanin viðvíkjandi samsýning og eftirløn til løgtingsfólk verður greiðari, at meira gjøgnumskygni verður viðvíkjandi lønarútreiðslunum til løgtingsfólk, og at tað verður lættari at rokna út, hvussu stórar útreiðslur landið hevur til fyrrverandi løgtingsfólk, tá farið verður frá tænastumannapensjón til ta pensjónsskipan, sum øll onnur brúka. Nevniliga at gjalda til sína egnu pensjón.

Hvørt talan er um samlaða hækking ella lækking í mun til verandi skipan er trupult at siga, tá tað veldst um, hvussu leingi einstaka tingfólkið hevur sæti á tingi.

Sambært landsroknskapunum fyri tey seinastu árini er eftirlønarskyldan hjá landskassanum til tænastufólk, landsstýrisfólk og løgtingsfólk útroknað tann 31/12 í 2012, 2016 og 2019. Fyri árini ímillum útrokningarnar eru eftirlønarskyldurnar roknaðar eftir broytingunum í livialdrinum, í rentuni og í talinum á fólkum í einstøku bólkunum.

| | Løgtingsfólk | Landsstýrisfólk |
|---|---:|---:|
| 31/12-2012 | 188.000.000 | 106.000.000 |
| 31/12-2016 | 276.000.000 | 161.500.000 |
| 31/12-2019 | 363.000.000 | 176.000.000 |

Sum sæst á omanfyristandandi talvu økist eftirlønarskyldan hjá landskassanum til landsstýrisfólk og løgtingsfólk so hvørt, sum árini ganga, og tað vil hon framhaldandi gera í enn og størri mun fyri løgtingsfólk so leingi, sum verandi pensjónsskipanin hjá løgtingsfólkum er galdandi.

Verður farið yvir til at rinda 15% av samsýningini í pensjónsskipan, so hvørt sum samsýningin til løgtingsfólk verður útgoldin, minkar so við og við eftirlønarskyldan til løgtingsfólk, eins og hon eisini hevur gjørt fyri landsstýrisfólk.

Tá landsstýrið tók við aftaná løgtingvalið í 2015 broyttist pensjónsskipanini hjá landsstýrisfólkunum soleiðis, at landsstýrisfólk fóru frá at fáa tænastumannaeftirløn til at 15% av lønarsamsýningini í eftirløn[2] . Í talvuni sæst, at hækkingin í eftirlønarskylduni til landsstýrisfólk er nógv lægri frá 2016 til 2019 enn frá 2012 til 2016.

Um pensjónsskipanin hjá løgtingsfólkunum verður broytt, soleiðis at hon verður líka sum tann hjá landsstýrisfólkum, fer tað sama at gera seg galdandi viðvíkjandi eftirlønarskylduni til løgtingsfólk.

[2] Løgtingsgslóg nr. 71 frá 19. mai 2014 um broyting í løgtingslóg um samsýning og eftirløn landsstýrismanna v.m.

# 3 Verandi skipan í Føroyum

## 3.1 Løgtingsfólk

Løgtingsfólk verða sambært stýrisskipanarlógini vald fyri 4 ár í senn. Løgtingið kann tó, eins og løgmaður, nær tað skal verða, skriva út nýval, sum hevur við sær, at tey løgtingsumboð, sum hava verið, falla burtur, tá nýggja løgtingið er sett.

Samsýning og eftirløn til løgtingsfólk er skipað sambært løgtingslóg nr. 12 frá 18. februar 1999. Eingin broyting er gjørd í lógini, síðani hon varð samtykt í 1999.

Niðanfyri eru mest týðandi liðini í lógini lýst.

### 3.1.1 Lønarsamsýning

Eftir galdandi lóg verða løgtingsfólk samsýnt samsvarandi 34. lønarflokki hjá tænastumonnum landsins, sum sambært núgaldandi lønartalvuni hjá tænastumonnunum svarar til eina mánaðarløn á kr. 46.373 (sambært semju millum FMR og Felag Tænastumanna Landsins 18. januar 2024), meðan løgtingsforfólkið verður samsýnt eftir somu reglum, sum eru galdandi fyri løgmann. Sí fylgiskjal 3.

Sambært løgtingslóg nr. 10 um samsýning og eftirløn landsstýrismanna v.m.[3], fær løgmaður eina samsýning, sum er 130% av 40. lønarflokki í tænastumannalógini. 40. lønarflokkur svarar sambært núgaldandi lønartalvuni hjá tænastumonnunum til eina mánaðarløn upp á kr. 74.682, og er samsýningin sostatt kr. 97.087.

Næstforfólk tingsins og nevndarforfólk verða, afturat mánaðarligu samsýningini, veitt serlig samsýning, sum er kr. 30.000 árliga.

Løgtingsforfólkið og næstforfólk sita alt valskeiðið uttan so, at tey sjálvboðin leggja frá sær ella fýra fimtingar av øllum tingfólkum skrivliga krevja nýval av forfólkum[4].

Við semjuni 18. januar 2024 millum FMR og Felag Tænastumanna Landsins, eru lønartalvur gjørdar, sum eru galdandi til 30. september 2025.

[3] Seinast broytt við kunngerð nr. 108 frá 15. september 2015

[4] Jf. §9, stk. 3, í lóg um stýrisskipan Føroya.

Fyri at kunna samanlíkna við hini londini, sum vit hava valt at samanlíkna okkum við, hava vit tó valt at brúka lønartalvuna galdandi frá 1. oktober 2023 til 30. september 2024 og eru samsýningarnar hjá løgtingsfólkum hesar:

| Lønarsamsýning kr. | Mánaðarlig | Árlig |
|---|---:|---:|
| Løgtingsforfólk | 97.087 | 1.165.044 |
| Næstforfólk í tinginum | 48.874 | 586.488 |
| Løgtingsfólk, sum eru nevndarforfólk | 48.874 | 586.488 |
| Løgtingsfólk | 46.374 | 556.488 |

Samsýningin verður útgoldin mánaðarliga frammanundan frá 1. degi í mánaðinum aftaná at løgtingið hevur góðkent valbrævið hjá viðkomandi løgtingsfólki, til endan á tí mánaði, løgtingsfólkið leggur tingsessin frá sær.

Løgtingsfólk fáa ikki frítíðaríkoyti/frítíðarløn.

### 3.1.2 Kostnaðaríkoyti

Umframt føstu samsýningina, sum er nevnd omanfyri, fáa øll løgtingsfólk eitt skattafrítt endurgjald upp á kr. 2.000 um mánaðin fyri t.d. samskiftisútreiðslur, skrivstovuhald v.m.. Hesar útreiðslur skulu ikki skjalfestast.

### 3.1.3 Kostnaðarendurgjald

Løgtingsfólk, sum búgva uttanfyri Suðurstreymoy[5], fáa afturat lønini og kostnaðaríkoytinum eitt árligt skattafrítt kostnaðarendurgjald grundað á reglurnar um endurgjald til tænastu- og starvsfólk. Kostnaðarendurgjaldið er roknað út eftir, at løgtingsfólk møta 100 dagar í Løgtinginum um árið.

Kostnaðarendurgjaldið verður latið soleiðis:

a. Flutningskostnað við egnum bili við Strandsfaraskipum Landsins 100 ferðir aftur og fram árliga.
b. Koyripeningur millum heimstað og Tórshavn 100 ferðir aftur og fram árliga.
c. Tímapeningur fyri 10 tímar dagliga (kr. 150 pr. dag) í 100 dagar, tó fáa suðuroyartingfólk fullan dagpening (kr. 250 pr. dag) í 100 dagar.

Sambært §1, stk. 3 í løgtingslóg um samsýning og eftirløn løgtingsmanna fær løgtingsfólk, sum er valt í øðrum valdømi enn Suðurstreymoy, men býr ella kann haldast at hava fast tilhald í Tórshavnar kommunu, endurgjald fyri eykaútreiðslur í hesum sambandi sambært §1, stk. 2, pkt. a, b og c 50 ferðir árliga, samsýning roknað eftir miðaltalinum millum Tórshavn og stytstu og longstu farleið til pláss í valdøminum, har viðkomandi er valt.

Tað skal í hesum sambandi viðmerkjast, at teksturin í §1, stk. 3 í lógini er ikki rættaður, síðani Føroyar blivu eitt valdømi.

[5]Tað vil í hesum førinum siga uttanfyri Tórshavn, Hoyvík, Argir og Hvítanes.

Skipanin verður sambært Løgtingsskrivstovuni praktiserað soleiðis í dag, at tingfólk, sum áðrenn valið búði uttanfyri Suðurstreymoy, men sum velur at flyta til Havnar, í sambandi við at viðkomandi verður valt á løgting, fær endurgjald fyri eykaútreiðslur svarandi til 50 ferðir árliga.

Fyri hvønn tingdag, tingfólk ikki møtir á løgtingsfundi, verður gjørdur frádráttur í kostnaðarendurgjaldinum, sum er 1/100 av kostnaðarendurgjaldinum. Niðanfyri eru nøkur dømi um, hvat tingfólk, ið býr uttanfyri høvuðsstaðarøkið, og sum møtir til allar tingfundir í árinum, hevur rætt til í skattafríum kostnaðarendurgjaldi.

| Árligt skattafrítt endurgjald, kr. | Árligt |
|---|---|
| Norðstreymoy (Vestmanna) | 40.600 |
| Eysturoy (Runavík) | 56.600 |
| Norðoyggjar (Klaksvík) | 63.000 |
| Vágar (Miðvágur) | 39.960 |
| Sandoy (Sandur) | 45.080 |
| Suðuroy (Tvøroyri) | 37.500 |

Samsýningarnar og kostnaðarendurgjaldið verða sambært §2, stk. 1, í lógini útgoldin við 1/12 mánaðarliga frammanundan frá 1. degi í mánaðinum, aftaná at løgtingið hevur góðkent valbrævið hjá viðkomandi løgtingsfólki, til endan á tí mánaði løgtingsfólk leggur tingsessin frá sær.

### 3.1.4 Ferðaútreiðslur

Í sambandi við ferðing uttanlands í løgtingsørindum verður sambært §1, stk. 6 í løgtingslóg um samsýning og eftirløn løgtingsmanna veitt ferðaendurgjald og dag- og tímapeningur eftir somu reglum, sum eru galdandi fyri tænastumenn landsins.[6]

### 3.1.5 Samskiftisútreiðslur

Í galdandi lóg eru ongar ásetingar um samskiftisútreiðslur. Nevndin hevur tó fingið upplýst frá Løgtingsskrivstovuni, at verandi siðvenja er, at løgtingsfólk fáa útflýggjað hvør sína teldu.. Flokkarnir fáa eisini eina árliga upphædd at ráða yvir. Upphæddin er ásett eftir talinum á tingfólkum[7].

[6] Avtala millum Fíggjarmálaráðið og Tænastumannafelag Landsins um dagpening, dagfest 20. august 2018 sum kom í gildi 1. november 2018.

[7] Reglugerð um stuðul til flokkarnar á tingi og um løn til floksskrivarar. Seinast dagførd 28. september 2022.

### 3.1.6 Fráfaringarsamsýning (bíðiløn)

Vit hava valt frameftir at nýta orðið fráfaringarsamsýning heldur enn bíðiløn, tí at lóg um samsýning og eftirløn løgtingsmanna[8] nýtir orðið “samsýning” og ikki bíðiløn, og tí at orðið lýsir betur, hvat samsýningin er ætlað til.

Verður løgtingsfólk ikki afturvalt ella má leggja tingsessin frá sær vegna sjúku, fær viðkomandi, sambært §2, stk. 2, 1. pkt. í løgtingslóg um samsýning og eftirløn løgtingsmanna, samsýning sambært §1, stk. 1 í somu lóg í 1 mánað fyri hvørt árið, viðkomandi hevur havt sess á løgtingi, tó í minsta lagi í 4 mánaðir og í mesta lagi í 6 mánaðir.

Fráfaringarsamsýningin er tann sama sum lønarsamsýningin.

Tá løgtingsforfólkið fer frá, fær viðkomandi, sambært §9, stk. 1, í lógini fráfaringarsamsýning í 6 mánaðir. Um fráfarna løgtingsforfólkið framvegis er tingfólk, fær viðkomandi bert ta hægru samsýningina.

Mótroknað verður ikki fyri aðrari inntøku í fráfaringarsamsýningini.

### 3.1.7 Við deyða

Doyr løgtingsfólk, fáa hjúnafelagi og/ella børn undir 18 ár, sambært §2, stk. 2, 2. pkt., í løgtingslóg um samsýning og eftirløn løgtingsmanna, samsýning eftir §1, stk. 1 í somu lóg í 6 mánaðir.

### 3.1.8 Varafólk

Varafólk fyri løgtingsfólk fáa, sambært §2, stk. 6 í løgtingslóg um samsýning og eftirløn løgtingsmanna, samsýning og forvinna sær eftirlønaraldur frá tí degi, viðkomandi hevur fingið tingsins góðkenning, ella um viðkomandi tekur við seinni so frá hesum degi, til viðkomandi fer frá. Fyri tíðarskeið, sum er minni enn 30 dagar, verður samsýningin hjá varafólki goldin sum 1/30 av samsýningini fyri hvønn dag, viðkomandi hevur sæti á tingi.

Varafólk, sum tekur sæti á tingi fyri løgtingsfólk, sum er vorðið landsstýrisfólk, hevur rætt til samsýning og forvinnur sær rætt til eftirlønaraldur, eisini um viðkomandi fer í farloyvi.

Tá varafólk, sum hevur tikið sæti á tingi av aðrari orsøk enn fyri løgtingsfólk, sum er vorðið landsstýrisfólk, fær farloyvi úr tinginum, hevur varafólkið ikki rætt til samsýning og forvinnur sær ikki eftirlønaraldur í farloyvistíðarskeiðnum.

### 3.1.9 Pensjónsviðurskifti

Løgtingsfólk hevur, sambært §4, stk. 1 í løgtingslóg um eftirløn og samsýning løgtingsmanna, rætt til egineftirløn (pensjón), tá ið viðkomandi hevur havt sæti á løgtingi í minsta lagi 1 ár tilsamans.

---

[8] Ll. nr. 12 frá 18. februar 1999 um samsýning og eftirløn løgtingsmanna.

Pensjónin verður útgoldin, tá ið løgtingsfólkið fyllir 67 ár, um viðkomandi ikki framvegis hevur sæti á løgtingi. Í serligum føri kann løgtingsfólk fáa eftirløn frá 60 ára aldri[9].

Hægsta eginpensjónin er 60% av pensjónsgevandi lønini í 34. lønarflokki, og verður henda veitt, tá ið løgtingsfólk hevur havt sæti á tingi í 16 ár ella meira.

Eitt løgtingsfólk vinnur sær rætt til pensjón soleiðis:

| Eginpensjón | Uppsparing |
|---|---|
| 1. til 8. árið | 4,5% árliga |
| 9. til 16. árið | 3% árliga |
| Tilsamans eftir 16 árum | 60% |

Hægsta pensjónin hjá løgtingsforfólkinum, sum er 60% av pensjónsgevandi lønini í lønarflokkinum, viðkomandi er samsýnt í, verður veitt, tá ið løgtingsforfólkið hevur verið forfólk í 8 ár ella meira. Eftirlønin til løgtingsforfólk kann tó, sambært §10 í løgtingslóg um samsýning og eftirløn løgtingsmanna ongantíð vera hægri enn 60% av 40. lønarflokki hjá tænastumonnum landsins.

Sambært §6 í lógini kann tingfólk, sum í útinnanini av løgtingsarbeiðinum kemur so álvarsliga til skaða, at viðkomandi verður óarbeiðsført í ein slíkan mun, at tað gevur rætt til endurgjald eftir lóg um vanlukkutrygging, fáa pensjón, sum um viðkomandi hevði havt sæti á tingi í meira enn 16 ár.

Serligar reglur eru í lógini, sum viðgera støðuna, tá løgtingsfólk hevur rætt til eginpensjón frá øðrum størvum.

Eisini eru ásettar reglur um pensjón til eftirsitandi hjúnafelaga og børn eftir løgtingsfólkum og løgtingsforfólkum.

### 3.1.10 Starvsreglur – onnur størv

Sambært §8 í stýrisskipanarlógini skal løgtingsfólkið, tá ið góðkent er, at viðkomandi er valt, leggja frá sær øll álitisstørv í nevndum, ráðum o.t., sum eru undir eftirliti landsstýrisins ella, sum landsstýrið hevur skipað viðkomandi í, tó undantikin beinleiðis fólkavald umboð.

Sambært §3 í løgtingslóg um samsýning og eftirløn løgtingsmanna hevur løgtingsfólk, sum er í starvi hjá landinum, eini kommunu, kommunalum felagsskapi, landsfyritøku ella hjá einum konsessioneraðum felag, rætt til farloyvi úr starvi sínum í tíðarskeiðinum, meðan viðkomandi hevur sæti á tingi.

Løgtingsfólk, sum er í starvi hjá einum av omanfyri nevndu stovnum ella hjá ríkinum, kann í mesta lagi starvast 50% av tíðini í hesum starvi, meðan hann/hon er løgtingsfólk ella varafólk fyri løgtingsfólk. Ongar avmarkingar eru fyri løgtingsfólk í privatari vinnu.

[9] Sbrt. §4, stk. 2 í løgtingslóg nr. 12 frá 18. februar 1999 um samsýning og eftirløn løgtingsmanna.

Sambært upplýsingum frá Løgtingsskrivstovuni vóru 7 tinglimir, sum hava ½ alment starv umframt tingsessin, tá hetta løgtingið tók við.

At tinglimir hava aðra inntøku frá politiskum arbeiði, t.d. í Fólkatinginum ella í kommunustýrum, er ikki fevnt av ásetingini í §3[10].

Hevur løgtingsforfólkið starv í almennari tænastu ella privatum virkjum, samtøkum ella stovnum, tá viðkomandi tekur við, skal viðkomandi, sambært §11, stk. 1 í løgtingslóg um samsýning og eftirløn løgtingsmanna vanliga siga tey frá sær. Løgtingsforfólkið hevur eins og onnur løgtingsfólk rætt til farloyvi úr borgarliga starvi sínum.

Løgtingsfólk hava, sambært §2, stk. 4 í løgtingslóg um samsýning og eftirløn løgtingsmanna, rætt til farloyvi uttan frádrátt í samsýning og eftirlønaraldri í sambandi við barnsburð ella ættleiðing.

### 3.1.11 Arbeiðstíð, frítíð o.a.

Tá lógin um samsýning og eftirløn løgtingsmanna kom í gildi í 1999 var, sambært almennu viðmerkingunum til lógaruppskotið, ætlanin, at løgtingsfólk skuldu hava løgtingsarbeiðið sum fulltíðarstarv ella í minsta lagi sum høvuðsstarv. Lønin hækkaði tá úr 17. til 34. lønarflokk, meðan fundarsamsýningarnar vórðu avtiknar og bert nevndarforfólk fingu samsýning.

Hendan áseting kom tó ikki í lógina tá, tí er tað ongantíð í lóg definerað, at talan er um fulltíðarstarv. Ymiskt er, hvussu nógva tíð løgtingsfólk brúka til at røkja starvið. Tað tykist tó sum, at alsamt fleiri løgtingsfólk velja at fara úr borgarliga starvið sínum fyri at røkja starvið sum løgtingsfólk bururav.

Hugsast kann, at tað vildi verið avmarkandi fyri skaran av, hvør valdi at stilla upp til løgtingið, um treytin fyri at gerast løgtingsfólk var at leggja øll onnur størv frá sær. Ein slík áseting kundi sostatt hugsast at havt ávirkan á fjølbroytni í tinginum.

At tingstarvið ikki er definerað sum eitt fulltíðarstarv sæst eisini aftur í ásetingini í lógini um samsýning og eftirløn løgtingsmanna, har tað er ásett, at tingfólk kunnu hava hálvtíðar alment starv við síðuna av tingarbeiðinum, og at eingin avmarking er fyri at hava privat starv við síðuna av[11]. Tað er einans løgtingsforfólkið, ið er avmarkað, tá ræður um hjástørv. Løgtingsforfólkið verður lønt ájavnt við løgmann og skal, eins og løgmaður/landsstýrisfólk, leggja onnur størv frá sær.

Løgtingið kemur saman á Ólavsøku, og setanin varar til Ólavsøku árið eftir. Í hesum tíðarskeiðið verða løgtingsfundir hildnir, og nógv fundarvirksemi er bæði í løgtingssalinum og í nevndum. Harumframt verður nógv tíð brúkt til fyrireiking.

Í 2023 vóru íalt 103 tingfundir. Í verandi tingsetu fram til ársenda 2023 vóru 39 tingfundir, í 2022 vóru 79 tingfundir, í 2021 vóru 83 tingfundir, í 2020 vóru 94 tingfundir, og í 2019 vóru 100 tingfundir. Øll árini hava verið færri fundardagar enn fundir, tí fleiri fundir hava verið sama dag.

[10] Sí serligu viðmerkingarnar til §3 í uppskotinum løgtingslóg sum samsýning og eftirløn løgtingsmanna.

[11] Sambært teldupost frá Johnhard Klettheyggj 30. januar 2018

Fíggjarnevndin hevur flest fundir og hevur havt uml. 40 fundir um árið seinnu árini, í 2023 hevði nevndin tó 57 fundir, harav 19 fundir í verandi tingsetu til ársenda í 2023. Hinar nevndirnar hava vanliga færri fundir.

Tingfólk arbeiða eisini í nevndunum, tá tingið ikki er saman. Tað eru kortini tíðarskeið, har virksemið í tinginum ikki er so stórt. Tað er vanliga friðarligt í august og september og í januar.

Tað er trupult at siga, hvussu nógv tingfólk hava frí/feriu. Hetta veldst óivað um tingfólkið sjálvt, men sum nevnt omanfyri, so eru tíðarskeið, har minni virksemi er og møguleiki er fyri at halda frí.

Tað verður ikki roknað frítíðarískoyti sambært reglunum um lóg um frítíð av samsýningini, sum tingfólk fáa fyri at røkja tingstarvið.

# 4 Skipanin í grannalondum okkara

Vit hava kannað, hvussu viðurskiftini eru viðvíkjandi samsýningum, pensjónum og eftirlønum v.m. hjá tinglimunum í nøkrum av teimum londunum, sum vit vanliga samanbera okkum við.

Vit hava hugt at viðurskiftunum í Grønlandi, Íslandi, Danmark og Norra, sum eisini eru tey londini samanlíknað varð við í álitunum um samsýning og eftirløn landsstýrismanna v.m. frá 2012 og 2017.

Í niðanfyri standandi gjøgnumgongd hava vit bert tikið tey viðurskifti við, sum eru viðkomandi at samanlíkna við tey føroysku viðurskiftini.

Nógv onnur viðurskifti eru ásett í grannalondunum, men tey eru í høvuðsheitum knýtt at teirra ørðrvísi umstøðum, bæði infrastrukturelt og í mun til stødd á landi og harvið fjarstøðu til høvuðsstaðin, har teirra ting heldur til.

Ymiskt er, sum fyrr nevnt, hvussu hugtøkini “eftirløn” og ”pensjón” verða nýtt í ymisku londunum, so vit hava valt at kalla alt tað, sum verður spart upp til pensjónsárini fyri “pensjón”, meðan aðrar serligar skipanir í sambandi við fráfaring, sum tó ikki er fráfaringarsamsýning, verða kallaðar “eftirløn”.

## 4.1 Grønland

**Starvið sum landstingslimur**

At vera landstingslimur verður í Grønlandi roknað sum eitt fulltíðarstarv. Tað eru tvær setur um árið. Ein frá apríl til og við juni og ein frá september til og við november.

Tað eru ongar avmarkingar ásettar viðvíkjandi, um landstingslimirnir kunnu hava onnur størv við síðuna av tingstarvinum.

Landstingslimirnir skulu tó altíð kunna røkja sín tingsess, serliga tá teir eru í Nuuk. Tá skulu teir søkja formansskapin um loyvi at fara úr býnum, meðan seta er, og reglurnar fyri hesum eru sera strangar. Tað er bert í heilt serligum førum, at loyvi verður givið.

Uttanfyri seturnar eru ikki somu strongu reglur.

### 4.1.1 Lønarsamsýning

Í Grønlandi fáa landstingslimir eina samsýning, sum er tengd at lønartalvuni fyri tænastumenn í Grønlandi (ASG–økið)[12]. Samsýningin til landstingsformannin er tengd at 38. lønarrammu, og samsýningin til landstingslimir er tengd at 35. lønarrammu.

[12] Samsýningar verða latnar eru sambært : Landstingslov nr. 22 af 18. december 2003 om vederlag m.v. til medlemmer af Landstinget og Landsstyret m.v. med de ændringer, som er en følge af Landstingslov nr. 1 af 27. marts 2006, Landstingslov nr. 8 af

Umframt lønina fáa landstingslimir aðrar viðbøtur, sum verða javnaðar samsvarandi lønarbroytingunum innan tænastumannaøkið í Grønlandi.

Samsýningarnar og viðbøturnar eru hesar galdandi frá 1. oktober 2022 í dkr:

| Lønarsamsýning dkr. | Mánaðarlig | Árlig |
|---|---|---|
| Landstingsformaður - lønarsamsýning og viðbøtur | 94.201 | 1.130.412 |
| Landstingslimur - lønarsamsýning og viðbøtur | 44.154 | 529.848 |

### 4.1.2 Kostnaðarískoyti

Landstingslimir hava rætt til kostnaðarískoyti til at rinda útreiðslur, sum standast av tingarbeiðnum, so sum samskiftisútreiðslur v.m. í sambandi við starvið sum landstingsfólk. Kostnaðarískoyti til tinglimir, sum í løtuni er kr. 69.643 um árið, er ikki skattskyldugt, um útreiðslurnar kunnu skjalprógvast, tað verður goldið saman við lønarsamsýningini, er ikki eftirlønargevandi og verður leypandi prístalsjavnað.

Umframt hetta fáa flokkar ella uttanflokkað landstingslimir árligt ískoyti til politiskt arbeiði[13].

Landstingslimir, sum búgva uttanfyri Nuuk, fáa frían bústað í Nuuk, so leingi tey eru tinglimir. Tey fáa harumframt endurgoldið flytiútreiðslur til og úr Nuuk eftir galdandi reglum fyri tænastumenn.

Landstingslimir í Nuuk, sum hava embætisbústað, sum teir mugu flyta úr, verða teir valdir inn á ting, fáa somuleiðis frían bústað.

### 4.1.3 Arbeiðsamboð

Landstingslimirnir fáa við byrjan handað teldu og teldil til nýtslu í tingarbeiðnum. Hesi amboð skulu latast aftur, tá tinglimir fara úr tinginum aftur.

### 4.1.4 Fráfaringarsamsýning

Landstingslimir hava rætt til fráfaringarsamsýning, sum svarar til mánaðarligu samsýningina í tinginum uttan kostnaðarendurgjald.

Fráfaringarsamsýningin verður goldin í minsta lagi í 3 mánaðir, annars fáa teir 1½ mánað samsýning fyri hvørt ár, teir samlað hava sitið á tingi.

Tað ber ikki til at fáa fráfaringarsamsýning sum landsstýrislimir og sum landstingslimur samstundis, tað kann bert rindast samsýning fyri annað starvið. Starvsaldurin verður roknaður út frá samlaðu funktiónstíðini í báðum størvunum, og kann í mesta lagi latast í 12 mánaðir.

---

1. juni 2006, Inatsisartutlov nr. 2 af 15. april 2011, Inatsisartutlov nr. 3 af 3. juni 2015 og Inatsisartutlov nr. 10 af 6. juni 2016 og Inatsisartutlov nr. 42 af 23. november 2017.

[13] https://ina.gl/media/2534140/f-nils-publikationer-love-landstingslov-om-oekonomisk-tilskud-til-politisk-arbejde-2018-da.pdf

Í tíðarskeiðnum fráfaringarsamsýning verður latin, kann tinglimur fáa ávístan fyribils bústað, sum skal rindast fyri eftir reglunum, sum eru galdandi fyri leiguíbúðir hjá Grønlendska heimastýrinum. Flytast skal úr bústaðnum, tá tíðarskeiðið, fráfaringarsamsýning verður goldin, er av.

Um tann, ið hevur rætt til fráfaringarsamsýning doyr, meðan hann er valdur í tingið, ella meðan hann fær fráfaringarsamsýning, hava eftirsitandi hjúnafelagi og børn rætt til fráfaringar samsýningina.

#### 4.1.5 Varalimir

Varalimir fáa fyri hvønn dag teir taka sæti fyri ein lim í landstinginum 1/365 av samsýningini og kostnaðarendurgjaldinum, sum landstingslimirnir fáa.

Varalimir fáa fráfaringarsamsýning svarandi til 1 dag fyri hvørjar 8 dagar, teir hava tikið sæti á tingi.

#### 4.1.6 Pensjónsviðurskifti

Frá 1. januar 2004 vórðu pensjónsviðurskiftini hjá landstingslimum skipað soleiðis, at goldið verður til ein pensjónskassa, sum tey antin hava frammanundan, ella ein, sum tey velja. Inngjaldið til skipanina er 10% av lønini frá arbeiðsgevaranum, umframt hetta verða 5% trekt av lønini hjá tinglimunum. Fólk, sum eru yvir 50 ár, tá ið tey gerast tinglimir ella varalimir, fáa eftirlønargjaldið útgoldið sum løn, tí mett verður, at tey hava ov fá ár eftir til, at tey kunnu fáa eina góða uppsparing við hesum.

Áðrenn hesa skipan fingu tinglimir tænastumannaeftirløn, roknað út frá teirra tænastualdri sum limir í landstinginum. Enn eru nøkur tingfólk, sum fáa tænastumannaeftirløn, tí koyra framvegis tvær skipanir síðuleypandi.

## 4.2 Ísland

**Starvið sum altingslimur**

At vera altingslimur verður roknað sum fulltíðarstarv. Altingið er saman frá øðrum týsdegi í september til jóla og so aftur frá hálvum januar til byrjanina av juni. Tað verða hildnir áleið 100 fundir árliga í altinginum. Harumframt er nevndararbeiði eisini í tíðarskeiðnum, tá Altingið ikki er saman.

Roynt verður at halda ein steðg í fundumum í tíðarskeiðnum frá hálvum juli til 10. august, so til ber hjá altingslimunum at halda feriu. Í hesum tíðarskeiðnum eru bert nevndarfundir, um tað er alneyðugt.

Í álitinum frá 2018 varð nevnt, at lønarsamsýningar v.m. hjá altingslimum vórðu ástettar eftir tilmæli frá Kjararáð, sum var eitt lønarráð, sum Altingið hevði sett. Hetta ráð varð valt fjórða hvørt ár. Men í 2018 varð Kjararáðið við lóg tikið av. Ístaðin varð ásett, at lønarsamsýningar v.m. skuldu fylgja lønarlagnum hjá alment settum í Íslandi. Í “Lög um þingfararkaup alþingismanna og þingfararkostnað” verða ásettar reglur um rakstur tingsins herundir ymiskar samsýningar so sum løn

fyri álitissessir (nevndarformenn o.a.), ferðaendurgjøld, vistarhaldskostnaðir, tryggingar og aðrar útreiðslur í sambandi við tingstarvið. Henda lóg er seinast dagførd 1. september 2023.

### 4.2.1 Lønarsamsýning

Frá 1. juli 2023 eru samsýningarnar hjá altingslimum hesar í dkr:

| Lønarsamsýning dkr. | Mánaðarlig | Árlig |
|---|---|---|
| Altingsformaður | 121.140 | 1.453.680 |
| Altingslimir | 69.927 | 839.124 |
| Vara (ting) formenn | + 15% | |
| Forfólk fyri fastar nevndir | + 15% | |
| 1. varaformaður | + 10% | |
| 2. varaformaður | + 5% | |
| Andstøðuleiðari (ikki ráðharri) | + 50% | |

### 4.2.2 Kostnaðarískoyti

Altingslimir fáa endurgoldið móti kvittan útreiðslur teirra í sambandi við starvið sum altingslimir m.a. til at skipa fyri fundum og tiltøkum, skeiðsvirksemi v.m., tó í mesta lagi 2.606 dkr. um mánaðin.

### 4.2.3 Hýsing og ferðakostnaður

Tinglimir fáa hesi endurgjøld fyri hýsing og ferðakostnað.

| Lønarsamsýning kr. | Mánaðarlig | Árlig |
|---|---|---|
| Húsarhald við bústaði uttanfyri Reykjavík | 8.731 | 104.772 |
| Um ikki verður flutt (koyring) | (1/3 av upphæddini omanfyri) 2.910 | 34.920 |
| Dupult úsarhald | 3.488 | 41.856 |
| Fastur ferðakostnaður (bústaður í Reykjavík) | 1.952 | 23.424 |
| Fastur starvskostnaður | 2.606 | 31.272 |

**Aðrar ferðaútreiðslur móti kvittan:**

Fyri hesa ferðing fáa altingslimir endurgoldið ferðaútreiðslur móti kvittan:

- Beinleiðis ferðing millum Reykjavik og egið øki.
- Ferðaútreiðslur til og frá ymsum økjum.
- Ferðaútreiðslur til ferðing ísv. luttøku í altjóða parlamentariskum arbeiði.

#### 4.2.4 Samskiftisútreiðslur

Allar telefonútreiðslur verða endurgoldnar móti kvittan.

#### 4.2.5 Annað

Landstingsformaðurin hevur bil.
Altingslimir hava hvør sína skrivstovu og fáa grundleggjandi skrivstovutænastu. Altingslimir fáa útflýggjað farteldu og teldil. Hesi amboð skulu latast aftur, tá altingslimur fer úr tinginum. Altingslimir fáa harumframt goldið fyri telefonútreiðslur og fáa annaðhvørt ár ISK 130.000, svarandi til umleið dkr. 6.591 at keypa fartelefon fyri. Fartelefonin skal ikki latast innaftur.

#### 4.2.6 Fráfaringarsamsýning

Altingslimir fáa fráfaringarsamsýning í 3 mánaðir, um tey hava sitið eina setu. Hava teir sitið tvær setur ella meira, fáa teir í 6 mánaðir fráfaringarsamsýning. Um fyrrverandi tinglimur fær nýtt starv í tíðarskeiðnum, hann fær fráfaringarsamsýning, og lønin er hægri enn fráfaringarsamsýningin, fellur fráfaringarsamsýningin burtur, er lønin lægri, verður mótroknað í fráfaringarsamsýningini.

#### 4.2.7 Varalimir

Varatinglimir fáa somu samsýning og kostnaðarendurgjald sum tinglimir, meðan teir eru á tingi. Varalimir fáa ikki fráfaringarsamsýning.

#### 4.2.8 Pensjónsviðurskifti

Frá 25. apríl 2009 at rokna er lógin um almenna pensjónsgrunnin eisini galdandi fyri altingslimir. Hesin eftirlønargrunnur er opin fyri øllum starvsfólkum hjá statinum.

Tinglimir gjalda 4% av allari løn sínari inn í grunnin. Harafturat rindar staturin 11,5% av lønini sum partur arbeiðsgevarans.

Tinglimir, sum høvdu vunnið sær rættindi eftir gomlu lógini áðrenn 2009, varðveita tey rættindini.

## 4.3 Danmark

**Starvið sum fólkatingslimur**

Tað framgongur ongastaðni, at tað at vera fólkatingslimur er eitt fulltíðarstarv. Sambært umsitingini hjá Fólkatinginum er orsøkin til hetta, at tað at verða fólkatingslimur ikki verður mett at verða eitt “starv”, men eitt “hverv”. Hetta er trupult at umseta til føroyskt, tí “hverv” sambært Sprotanum er tað sama sum “starv”, men á donskum verður tað ikki mett at vera tað sama.

Ongar ásetingar ella avmarkingar eru heldur um, hvørt ein fólkatingslimur kann hava annað starv, meðan viðkomandi er fólkatingslimur.

Fólkatingið er saman frá fyrst í oktober til fyrst í juni. Fólkatingið verður tó eisini kallað saman í tíðarskeiðnum frá juni til september, um okkurt er at viðgera. Ein fundur var í september 2023.

Í meðal verða hildnir umleið 100 fundir í Fólkatinginum um árið. Harumframt er nevndararbeiði eisini í tíðarskeiðnum, tá fólkatingið ikki er saman.

Ein "Vederlagskommissión" var sett í 2014 at endurskoða samsýningar og pensjóns– og eftirlønarviðurskiftini v.m. hjá donskum borgarstjórum, regiónsformonnum, fólkatingslimum og ráðharrum. Niðurstøðan var løgd fram í einum áliti í 2016[14]. Har vóru nógv tilmæli til broytingar, men í nýggjastu vallógini, sum er sett í gildi, eru langt frá øll tilmælini tikin við.

Mest áhugaverda tilmælið var at kollvelta verandi donsku pensjónsskipanina fyri tinglimir soleiðis, at fólkatingslimir framyvir skuldu hava somu pensjónsskipan, sum alment sett starvsfólk í Danmark hava. Høvuðssjónarmiðið í tilmælinum var, at fólkatingslimir skuldu fáa meira í samsýning, meðan teir vóru virknir tinglimir og minni aftaná. Hetta var eitt av teimum tilmælum, sum ikki vann frama, tá vallógin var broytt.

### 4.3.1 Lønarsamsýning formaður og fólkatingslimir

Í Danmark er samsýningin til limir í Fólkatinginum hendan (apríl 2023):

| Lønarsamsýning dkr. | Mánaðarlig | Árlig |
|---|---:|---:|
| Formaður í Fólkatinginum | 138.740 | 1.664.880 |
| Fólkatingslimur | 61.662 | 739.944 |

Soleiðis eru reglurnar sambært donsku vallógini:

### 4.3.2 Fólkatingsformann

Samsýningin til fólkatingsformannin er 125% av samsýningini til ráðharrar. Kostnaðarendurgjaldið er samsvarandi reglunum fyri fólkatingslimir.

Pensjóns- og eftirlønarviðurskifti hjá fólkatingsformanninum eru samsvarandi reglunum fyri ráðharrar. Fær ein pensjoneraður formaður ráðharrasess, fellur formanspensjónin burtur.

Hevur ein bæði verið fólkatingsformaður og ráðharri verður ásett ein pensjón, og pensjónsaldurin er tá tær samanløgdu funktiónstíðirnar.

**Fráfaringarsamsýning fyri fólkatingsformenn**

Fólkatingsformenn fáa fráfaringarsamsýning í minst 6 og í mesta lagi í 36 mánaðir, alt eftir hvussu long formanstíðin hevur verið. Øll onnur inntøka verður mótroknað í fráfaringarsamsýningini.

[14] Januar 2016 Rapport fra Vederlagskommisionen

**Pensjón fyri fólkatingsformenn**

Fólkatingsformaðurin hevur rætt til pensjón aftaná í minsta lagi 1 ára formanstíð. Pensjónin verður roknað út frá, hvussu long formanstíðin hevur verið. Hægsta pensjón fæst eftir 8 ára formanstíð og er (í oktober 2023) kr. 31.955 um mánaðin.

Samsýningarnar verða javnaðar eina ferð árliga hvønn 1. apríl við sama javningarprosenti sum samsýning til ráðharrar sambært "lov om vederlag og pension m.v. for ministre[15]".

### 4.3.3 Fólkatingslimir

**Kostnaðarískoyti**

Fólkatingslimir fáa kostnaðarískoyti til at rinda útreiðslur í sambandi við starvið. Kostnaðarískoytið er kr. 5.903,67 um mánaðin pr. 1. oktober 2023 (fyri fólkatingslimir úr Føroyum og Grønlandi er kostnaðarískoytið kr. 7.871,50).

Kostnaðarískoytið er skattafrítt. Útreiðslur skulu ikki skjalfestast.

**Hýsing**

Fólkatingslimir, sum búgva uttanfyri Sæland, fáa tillutað frían bústað frá Fólkatinginum. Teir fáa harumframt gjald fyri dupult húsarhald.

**Ferðaútreiðslur[16]**

Fólkatingslimir fáa endurgoldið útreiðslur til almenn flutningsfør og ferðir í sambandi við fólkatingsarbeiði.

Fólkatingslimir fáa harumframt fríkort til: DSB, MOVIA, Brobizz og Kbh. Metro.

Fólkatingslimir kunnu fáa endurgjald fyri útreiðslur í sambandi við koyring í egnum bili millum egnan bústað og Christiansborg, bústað og politiskar fundir og Christiansborg og politiskar fundir, um útreiðslurnar koma ístaðin fyri ein innanríkisflogferðaseðil, og útreiðslurnar ikki eru hægri enn kostnaðurin av hesum flogferðaseðli.

Fólkatingslimir, sum búgva uttanfyri høvuðstaðarøkið, kunnu fáa endurgjald fyri koyring í egnum bili frá egnum bústaði til næstu floghavn/tokstøð, um ikki skikkað alment ferðasamband er, tá limirnir skulu til ella frá Christiansborg ella luttaka í tænastuferð fyri Fólkatingið uttanlands.

[15] Lov om vederlag og pension m.v. for ministre, jf. lovbekendtgørelse nr. 273 af 20. april 2004, med de ændringer, der følger af § 16 i lov nr. 1587 af 20. december 2006, lov nr. 704 af 25. juni 2010, lov nr. 480 af 30. maj 2012, lov nr. 743 af 1. juni 2015, § 17 i lov nr. 628 af 8. juni 2016 og lov nr. 492 af 22. maj 2017, samt lovbekendtgørelse nr. 939 af 16. juni 2017, med senere ændringer. Ministrenes grundvederlag er midlertidigt nedsat med 5 pct. i perioden 2011 til 2023, jf. lov nr. 2609 af 28. december 2021

[16] http://www.ft.dk/~/media/sites/ft/pdf/medlemmer/om-medlemmer/medlemmernes-vilkaar/folketingets_rejseregler_2017.ashx?la=da

Ferðaendurgjald er samsvarandi reglunum ásettar av skattaráðnum.

**Fráfaringarsamsýning**

Fráfaringarsamsýning verður latin, um limur fer úr fólkatinginum orsakað av fólkatingsvali ella sjúku, í minst 6 mánaðir og í mesta lagi 24 mánaðir, - alt eftir hvussu leingi viðkomandi samanhangandi hevur sitið í Fólkatinginum ella verið limur í Europaparlamentinum, um talan er um eitt samanhangandi tíðarskeið. Hevur viðkomandi sitið í báðum parlamentunum, telur tó bert eitt tíðarskeið. Fráfaringarsamsýningin er tann sama sum lønarsamsýningin. Mótroknað verður fyri aðra inntøku í fráfaringarsamsýningini tó ikki fyri kr. 157.564 fyrstu 12 mánaðirnar í fráfaringartíðarskeiðnum.

### 4.3.4 Varalimir

**Samsýning**

Varalimir fáa samsýning frá degnum eftir, at tann, tey taka sæti fyri, er farin frá og til endan av tí mánaðinum, har tann, tey hava sæti fyri, tekur sætið aftur, ella vildi verið farin úr fólkatinginum.

**Fráfaringarsamsýning**

Varalimir fáa fráfaringarsamsýning í einum tíðarskeiði, sum svarar til helvtina av setanartíðarskeiðnum, um setanin hevur vart í minsta lagi í 6 mánaðir.

Mótroknað verður í fráfaringarsamsýningini á sama hátt sum hjá fólkatingslimum.

### 4.3.5 Eftirløn – og Pensjón

**Eftirløn**

Eftirløn hjá fólkatingslimum er ein skipan, til tá ein fólkatingslimur tekur seg aftur, og hon kann rindast um viðkomandi er limur í arbeiðsloysistrygging og hevur goldið eftirlønargjald. Eftirlønarskipanin gevur møguleika fyri at gevast á arbeiðsmarknaðinum upp til 5 ár áðrenn fólkapensjónsaldur.

Øll gjøld verða javnað samsvarandi javning í lóg um tænastumannapensjón.

**Pensjón**

Nýggj lóg kom í gildi í 2017[17]

[17] Lov om valg til Folketinget, jf. lovbekendtgørelse nr. 392 af 26. april 2017 med de ændringer, der følger af lov nr. 493 af 22. maj 2017, lov nr. 708 af 8. juni 2017 og lov nr. 714 af 8. juni 2017

Lógin er galdandi fyri øll, sum vera vald ella afturvald í Fólkatingið við fyrsta val aftaná, at lógin er komin í gildi. Fyri limir, sum fara úr Fólkatinginum við fyrsta val aftaná, at lógin kom í gildi ella fyrr, eru fyrr galdandi reglur framvegis galdandi.

Fólkatingslimir vinna sær pensjónsrætt, tá teir í einari ella fleiri setum hava sitið í Fólkatinginum í minst eitt ár. Ongin fær tó fólkatingspensjón so leingi, sum viðkomandi fær lønarsamsýning ella fráfaringarsamsýning frá Fólkatinginum.

Ein fyrrverandi fólkatingslimur, sum varð valdur áðrenn 1. juli 2007, kann fáa fólkatingspensjón útgoldnað, sum er innvunnin áðrenn 1. juli 2012, tá viðkomandi fyllir 60 ár.

**Fólkatingspensjón**

Fólkatingspensjón, sum er innvunnin aftaná 1. juli 2012, kann í fyrsta lagi rindast út, tá fyrrverandi limurin røkkur aktuellum pensjónsaldri, ístaðin kann vera veitt eitt ískoyti, inntil viðkomandi røkkur fólkapensjónsaldri, sum fyri hvørt limaár er 1/20 av ískoytinum sambært tænastumanna-pensjónslógini §6 stk. 3. Við útgjaldi styttri enn tvey ár aftaná pensjónsútgjaldingaraldurin verður ískoytið tó helvtarbýtt.

Harumframt verður eitt fyritíðarpensjónsfrádráttur drigin frá soleiðis:
Fyritíðarpensjónsfrádráttur

- Við útgjaldi styttri enn 1 ár aftaná pensjónsútgjaldingaraldurin 17 pct.
- Við útgjaldi frá 1 til 2 árum aftaná pensjónsútgjaldingaraldurin 14 pct.
- Við útgjaldi frá 2 til 3 árum aftaná pensjónsútgjaldingaraldurin 6 pct.
- Við útgjaldi frá 3 til 4 árum aftaná pensjónsútgjaldingaraldurin 5 pct.
- Við útgjaldi frá 4 til 5 árum aftaná pensjónsútgjaldingaraldurin 4 pct.
- Við útgjaldi frá 5 til 6 árum aftaná pensjónsútgjaldingaraldurin 3 pct.
- Við útgjaldi frá 6 til 7 árum aftaná pensjónsútgjaldingaraldurin 1 pct.

Fólkatingspensjón sum er innvunnin aftaná 1. juni 2017, kann í fyrsta lagi rindast út, tá viðkomandi røkkur fólkapensjónsaldri.

Hægsta pensjón fæst eftir 20 ár sum fólkatingslimur, og aktuella hægsta upphædd er kr. 32.959 (oktober 2023) um mánaðin.

Pensjónin verður vunnin soleiðis:

| | |
|---|---|
| 1 - 9 ár | 3,25% |
| 10 - 17 ár | 2,80% |
| 18 - 19 ár | 1,80% |
| 20 ár | 1,75% |

Fráfaringarsamsýningarreglurnar fyri tænastumenn eru eisini galdandi fyri fólkatingslimir.

Eftirsitandi hjúnarfelagi og børn undir 18 ár fáa pensjón eftir serligum reglum.

## 4.4 Noreg

**Starvið sum stórtingslimur**

At vera stórtingslimur verður roknað sum fulltíðarstarv. Tingið er saman frá oktober til triðja fríggjadag í juni. Tað verða hildnir áleið 100 fundir í Stórtinginum, harumframt er nevndararbeiðið bæði í Stórtinginsnevndum og í altjóða delegatiónum eisini í tíðarskeiðnum, tá Stórtingið ikki er saman.

Í høvuðsheitum eru ikki fundir í Stórtinginum frá seinastu viku í juni til oktober, men limirnir hava ikki “frí” fyri tað. Tá verður væntað, at teir luttaka í nevndararbeiði og arbeiða í egnum valdømi og fyri flokkin.

Stórtingslimir hava í praksis ikki meira enn 5 vikur feriu undir vanligum umstøðum.

Í Noregi er eitt lønarráð nevnt Stortingets Lønkommission. Stórtingið velur Ráðið, sum tekur sær av at áseta lønirnar hjá ráðharrum og stórtingslimum á hvørjum ári. Stórtingið skal tó góðkenna lønarásetingarnar.

Ráðið hevur ikki um hendi at áseta onnur viðurskifti, so sum pensjón, innivist, bilskipan, kostnaðarendurgjald o.a. Pensjónsviðurskiftini og fráfaringarsamsýningin eru reglerað við lóg, meðan onnur starvsviðurskifti í stóran mun verða ásett av forsætismálaráðharranum.

### 4.4.1 Lønarsamsýning

Samsýningin hjá stórtingslimum í Noregi er frá 1. mai 2023 í dkr[18]:

| Lønarsamsýning dkr. | Mánaðarlig | Árlig |
|---|---:|---:|
| Stórtingsformaður | 102.327 | 1.227.924 |
| Stórtingslimir | 58.248 | 698.976 |
| Varaformaður | +14% | |
| Nevndarformenn | +7% | |

Lønirnar eru ikki beinleiðis knýttar at nøkrum lønarsáttmála á arbeiðsmarknaðinum, men lønarráðið hevur skyldu til at taka atlit at lønargongdini í samfelagnum annars.

### 4.4.2 Farloyvi

Í sambandi við farloyvi varðveita stórtingslimirnir samsýningina upp til 14 dagar, um teir ikki fráboða, at teir ikki ynskja tað.

[18] Norska krónan er nógv lækkað í virði síðan 2017. tá var kursurin áleið 79. Kursurin 28. oktober 2023, sum er brúktur her, var 63,13

Stórtingið kann eftir umsókn avgera, at stórtingslimur, sum er í farloyvi, kann varðveita samsýningina í meira enn 14 dagar undir hesum umstøðum:

a) Við farloyvi orsakað av sjúku ella skaða
b) Við farloyvi til luttøku í ferð sum limur av sendinevnd, sett av stórtinginum ella formansskapinum
c) Við farloyvi fyri at luttaka á fundum ella fyri at fremja aðrar uppgávur sambært tilnevning av Kongi, Stórtinginum ella ráðið
d) Við farloyvi játtað av vælferðarorsøkum

Um søkt verður um farloyvi eftir pkt. a), skal læknaváttan latast saman við umsóknini, ella skjótast til ber aftaná, at farloyvi er játtað. Verður hetta ikki gjørt, kann formanskapurin avgera, at samsýningin fellur burtur fyri restina av farloyvinum.

Við barsils-, umsorganar- og føðifarloyvi og farloyvi vegna sjúk børn ella barnaansing, hava stórtingslimirnir rætt til samsýning eftir somu reglum sum starvsfólk hjá statinum. Hetta sambært kap. 12 í lóg um arbeiðaravernd, kap. 14 í lóg um fólkatrygd og reglunum í "hovedtariffavtalen" hjá statinum. Hetta er eisini galdandi fyri varalimir í tíðarskeiðnum, sum teir eru innkallaðir.

### 4.4.3 Hýsing

Stórtingið eigur 147 møbleraðar íbúðir í Oslo, sum kostnaðarfrítt verða latnar limum, sum búgva meira enn 40 km í koyrifrástøðu frá Oslo.

### 4.4.4 Ferðaútreiðslur

Stórtingslimir, sum eru í tænastuørindum í sambandi við útinning av stórtingsarbeiði innlendis ella uttanlands, fáa endurgoldið sínar ferðaútreiðslur sambært vanligu reglunum hjá statinum.

Stórtingið er at meta sum fasta arbeiðsplássið fyri stórtingslimirnar. Um ikki annað er avgjørt, verður ferðing millum Stórtingið og bústaðin (antin fyribils ella fastan) at meta sum privatar ferðir, sum stórtingslimirnir rinda sjálvir.

Limir, sum búgva meira enn 40 km frá Stórtinginum, fáa endurgoldið útreiðslur til ferðing til og frá Stórtinginum við byrjan og enda, "sesonbyrjan" og "sesongenda".

Við sjúku ella skaða kunnu limir fáa endurgoldið serligar útreiðslur til ferðing til og frá Stórtinginum.

Við farloyvi orsakað av sjúku, skaða ella av vælferðarorsøkum, kunnu stórtingslimir fáa endurgoldið ferðaútreiðslur til og frá Stórtinginum og heimstaðið ella annað innlendis uppihaldsstað.

Um egið akfar verður nýtt, eru reglurnar um kilometurendurgjald fyri tænastuferðir í statinum galdandi.

### 4.4.5 Frítíðarpeningur

Stórtingslimir, sum ikki verða afturvaldir, fáa frítíðarpening sambært áseting í "Hovedtariffavtalen i staten" í januar mánaði árið eftir valið.

Frítíðarpeningurin verður roknaður út við støði í samsýningini, sum er útgoldin seinasta álmanakkaár í valtíðarskeiðnum, íroknað fráfaringarsamsýningina. Hetta er eisini galdandi fyri fast atknýttir varalimir, sum fara úr Stórtinginum millum 1. juli og 31. desember.

Stórtingslimir, sum gerast ráðharrar, fáa ikki frítíðarpening.

Frítíðarpeningur verður heldur ikki latin varalimum, sum sambært avgerð frá formansskapinum varðveita samsýning í tíðarskeiðnum, aftaná at Stórtingið er farið heim í juni. Hesir fáa feriupening eftir reglunum, sum áseta, at teir fáa feriupening útgoldnan í januar árið eftir, at viðkomandi er farin frá sum varalimur.

### 4.4.6 Varalimir

Varalimir fáa somu samsýning sum stórtingslimir fyri teir dagar, teir taka sæti í Stórtinginum. Teir fáa eisini samsýning fyri hvønn dag ella part av degi, sum er longri enn seks tímar, sum er neyðugur fyri at ferðast til og frá Stórtinginum, og sum fella uttanfyri teir dagar, varalimirnir møta.

Varalimir kunnu eisini sambært umsókn til formansskapin í Stórtinginum varðveita samsýningina í tíðarskeiðum, sum tey ikki eru innkallað eftir hesum reglum:

- Í tíðarskeiðum uttan fundir í plenum, tá varalimur møtir fyri stórtingslim, sum væntast at verða burturstaddur eisini aftaná aktuella tíðarskeiðið
- Árið út aftaná seinasta innkallingardag áðrenn jól, um varalimurin hevur verið inni í minst tveir mánaðir í tíðarskeiðnum og ikki hevur aðra inntøku í tí tíðarskeiðnum, har søkt verður um at varðveita samsýningina
- Í øðrum serligum førum

Samsýning til varalimir verða útgoldin mánaðarliga.

Innkallaðir varalimir fáa endurgoldið faktiskar útreiðslur til gisting í tíðarskeiðnum, teir eru inni.

Fyri valdar limir, sum fara úr Stórtinginum uttan at tað er val, ella sum fáa farloyvi restina av valtíðarskeiðnum, galda somu reglur um samsýning v.m. sum fyri fastar varalimir, sum fara úr Stórtinginum.

### 4.4.7 Fráfaringarsamsýning

Fráfaringarsamsýning kann veitast stórtingslimum fyrstu 3 mánaðirnar. Eftir umsókn til formansskapin kunnu tey, sum fara frá, søkja um fráfaringarsamsýning. Hendan verður bert játtað, um løgd verður fram eginváttan um inntøkustøðu. Fráfaringarsamsýningin er tann sama sum samsýningin til stórtingslimir.

### 4.4.8 Eftirløn og pensjón

**Eftirløn:**

Eftirløn kann veitast aftaná 3 mánaðir og fráfaringarsamsýning upp til 12 mánaðir, um viðkomandi kann dokumentera at vera aktivt arbeiðsleitandi ella í holt við eina førleikagevandi eftirútbúgving. Eftirløn verður ikki veitt tí, sum er í holt við at byrja egið virksemi.

Fyri báðar omanfyri nevndu veitingar er galdandi, at tær kunnu minkast ella detta burtur um viðkomandi fær aðra inntøku. Øll inntøka skal skjalprógvast. Stórtingið tekur avgerð um støddina av inntøku, sum avmarkar eftirløn og fráfaringarsamsýning. Inntøka omanfyri NOK 5.000 verður minkað krónu fyri krónu. Arbeiðir viðkomandi meira enn 30 t um vikuna, fellur veitingin heilt burtur.

**Pensjón:**

Nýggj lóg "om pensjonsordning for stortingsrepresentanter og regjeringsmedlemmer" kom í gildi 1. januar 2012 og er seinast broytt 1. juni 2022.

Broytingin av pensjónsskipanini fyri stórtingslimir og stjórnarlimir hevur við sær, at fyrrverandi pensjónsskipanir eru avloystar av einari pensjónsskipan, ið byggir á somu prinsippir, sum nýggja alduspensjónin í "Folketrygden", har pensjónin verður latin sum eitt beinleiðis ískoyti til alduspensjónina frá "Folketrygden".

Hetta merkir m.a., at skipanin er farin frá at vera ein bruttoskipan tengd at endalønini til at verða ein nettoskipan.

Sambært pensjónskipanini verður pensjónin innvunnin við, at settur verður av ein prosentpartur av samsýningini til stórtingslimir og stjórnarlimir. Innvinningin av pensjónini er 6,03% av samsýning upp til 7,1 G, sum svarar til NOK 842.202 (G – 1.mai 2012 var = NOK 118.620. Síðani er pensónsuppsparingin 24,13% av samsýningini millum 7,1 G (NOK 842.202) og 12 G (NOK 1.423.440). Pensjónsuppsparingin verður javnað við lønarvekt fram til alduspensjónsaldur. Lønarvøksturin verður ásettur av Kongi í statsráð.

Árliga pensjónin verður roknað við at býta innvunnin pensjónsrættindi við einum deilitali. Deilitalið avspeglar væntaðan livialdur aftaná pensiónsaldurin. Tað merkir, at pensjónin verður livialdursjavnað á sama hátt sum "Folketrygden".

Aldurspensjónin kann takast út fleksibult frá 62 til 75 ár eftir somu treytum sum í "Folketrygden". Møguleiki er somuleiðis fyri at sameina arbeiði og pensjón, uttan at pensjónin minkar.

Óarbeiðsføris- og eftirsitipensjón verður í høvuðsheitum veitt samsvarandi reglunum í lóg nr. 26 frá 28. juli 1949 um "Statens pensjonskasse".

Vunnin rættindi áðrenn útgjalding verða útgoldin í samsvari við lønarvøksturin.

Aldurspensjónin undir útgjalding verður javnað samsvarandi lønarvøkstrinum, tó verða 0,75% frátrekt. Tað vil siga, at pensjónsgjaldið verður javnað sum "Folketrygden".

Aldurspensjón, sum verður tikin út, áðrenn viðkomandi er 67 ár, skal umroknast frá mánaðinum eftir, at viðkomandi er fylt/ur 67 ár. Tað verður gjørt á tann hátt, at pensjónsgrundarlagið verður javnað við lønarvøkstrinum frá tí, at pensjónin varð tikin út og fram til umrokningartíðspunktið.

Tað eru skiftisreglur, sum tryggja rættindi innvunnin eftir gomlum innvinningarskipanum. Fyri tey, sum bæði innvinna eftir gamlari og nýggjari pensjónsskipan, eru reglur um, at pensjónin má ikki vera hægri enn roknaða hægsta pensjónin.

Stórtingslimir, sum ikki høvdu innvunnið rætt til pensjón áðrenn 1. oktober 2009, og stjórnarlimir, sum ikki høvdu innvunnið pensjón áðrenn 1. januar 2012, vinna pensjón eftir nýggju reglunum frá 1. oktober 2009. Fyri allar aðrar limir fingu nýggju reglurnar virknað frá 1. januar 2012.

# 5. Lønarlagið í føroyska samfelagnum

Av arbeiðssetninginum hjá nevndini sæst, at nevndin í sínum tilmæli skal taka atlit at lønarlagnum í landinum yvirhøvur og tí tign og ábyrgd, sum liggur í tingsessinum.

Lønarlagið hjá privatu vinnuni í Føroyum er ikki serliga gjøgnumskygt. Tað finnast ikki beinleiðis hagtøl, sum lýsa viðurskiftini nærri, hvørki tá ið talan er um serstakar (individuellar) sáttmálar, ella tá talan er um lønarsamsýning sambært kollektivu sáttmálunum. Kollektivu sáttmálarnir á privata arbeiðsmarknaðinum eru minimumssáttmálar, og tað er ikki óvanligt, at einstøku arbeiðsplássini individuelt avtala eina hægri løn/samsýning enn ásett í kollektiva sáttmálanum.

Tað finnast heldur ikki beinleiðis hagtalsupplýsingar um lønarlagið á almenna arbeiðsmarknaðinum. Í mun til privata arbeiðsmarknaðin er lønarlagið har tó meiri gjøgnumskygt við tað, at alment sett starvsfólk eru starvssett við tilvísing til ein kollektivan sáttmála og hartil hoyrandi lønartalvu uttan møguleika fyri at víkja frá hesum (maksimumsáttmálar). Tað ber eisini til at fáa upplýst frá almennu arbeiðsgevarunum, hvussu leiðarar og starvsfólk eru lønt.

Fyri at fáa eina fatan av lønarlagnum á privatu og almennu arbeiðsmarknaðunum hevur nevndin fingið til vega upplýsingar frá Hagstovu Føroya um lønarútgjaldingar (A-inntøkur) í november 2022 býtt á høvuðsvinnurnar og lønartalstrekkir.

**Privata lønarlagið**

Høvuðsvinnurnar eru "Almenn o.o. tænasta", "Byggivinna o.o. tilvirking", "Fiskivinna o.o. ráevnisvinna" og "Privatar tænastuvinnur". November mánaður er valdur, tí hesin mánaður sambært Hagstovu Føroya er best umboðandi mánaður á árinum til at gera eina slíka uppgerð.

Skal lønarsamsýningin hjá tingfólkum samanberast við lønarlagið í privatu vinnuni, meta vit, at av teimum høvuðsvinnum, sum hagtølini fyri privatu vinnuna eru býttar í, so kunnu starvsviðurskiftini hjá tingfólkum best samanberast við starvsviðurskiftini hjá teimum, sum eru bólkað undir "Privatar tænastuvinnur". Niðanfyri verða tískil einans víst tøl frá hesi høvuðsvinnugrein.

*Talva 1: Tal av lønarútgjaldingum í privatu tænastuvinnuni í november 2011, 2021 og 2022, býtt í lønartalstrekkir.*

| | | | Privatar tænastur | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | | | Tal á lønarútgjaldingum | | | Lønarútgjaldingar í % | | |
| Lønarintervall, kr. | | | 2011 | 2021 | 2022 | 2011 | 2021 | 2022 |
| 0 | - | 40.000 | 8.658 | 10.542 | 10.384 | 91,0% | 83,1% | 82,3% |
| 40.000 | - | 50.000 | 455 | 1.099 | 1.145 | 4,8% | 8,7% | 9,1% |
| 50.000 | - | 60.000 | 190 | 562 | 575 | 2,0% | 4,4% | 4,6% |
| 60.000 | - | 70.000 | 94 | 235 | 233 | 1,0% | 1,9% | 1,8% |
| 70.000 | - | 80.000 | 47 | 94 | 108 | 0,5% | 0,7% | 0,9% |
| 80.000 | - | 90.000 | 25 | 41 | 49 | 0,3% | 0,3% | 0,4% |
| 90.000 | - | 100.000 | 15 | 31 | 37 | 0,2% | 0,2% | 0,3% |
| 100.000 | - | | 28 | 82 | 88 | 0,3% | 0,6% | 0,7% |
| Tilsamans | | | 9.512 | 12.686 | 12.619 | 100,0% | 100,0% | 100,0% |

*Kelda: Hagstova Føroya*

Av talvuni sæst, at í november 2011 vóru tilsamans 9.512 lønarútgjaldingar í privatu tænastuvinnuni, harav 91,0% vóru niðanfyri kr. 40.000 og 4,8% vóru millum kr. 40.000 og kr. 50.000. Hóast lønarútgjaldingarnar økjast í tali bæði í 2021 og aftur í 2022, so lækkar tann lutfalsligi parturin, sum er niðanfyri kr. 40.000, meðan so at siga allar lønarútgjaldingarnar í talstrekkjunum omanfyri kr. 40.000 økjast bæði í tali og í lutfalli.

Mánaðarliga lønarsamsýningin til løgtingsfólk er í dag ásett eftir 34. lønarflokki í lønartalvuni, sum er galdandi fyri tænastumenn landsins. Henda er síðan 1. oktober 2023 kr. 46.374 Sí fylgiskjal 3.

Tað skal viðmerkjast, at tølini omanfyri einans vísa sjálva A-inntøkuna, sum er útgoldin í privatu tænastuvinnuni í november 2011, 2021 og 2022. Ongar upplýsingar fyriliggja um møgulig eftirlønargjøld ella fríar ágóðar hjá hesum starvsbólki. Heldur ikki er óvanligt, at tað í privatu tænastuvinnuni verður útgoldið vinningsbýti til eigarar av fyritøkum, sum samstundis fáa A-inntøku frá fyritøkuni. Tí skal eitt ávíst fyrivarni takast í hesum sambandi.

**Almenna lønarlagið**

Tað lønarlag innan tað almenna, sum best kann samanberast við samsýning til løgtingsfólk, er lønarlagið "Almennar tænastur".

Almennar tænastur fevna um almennu fyrisitingina hjá landi, kommunum og ríkisstovnum, harafturat eru undirvísingar- og mentamálaráðið og heilsu- og almannaverkið.

*Talva 2: Tal av lønarútgjaldingum í almennu tænastum í november 2011, 2021 og 2022, býtt í lønartalstrekkir.*

| | Almannar tænastur o.a. | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | Tal á lønarútgjaldingum | | | Lønarútgjaldingar í % | | |
| Lønarintervall, kr. | 2011 | 2021 | 2022 | 2011 | 2021 | 2022 |
| 0 - 40.000 | 10.291 | 12.904 | 13.333 | 94,8% | 87,3% | 86,1% |
| 40.000 - 50.000 | 400 | 1.276 | 1.429 | 3,7% | 8,6% | 9,2% |
| 50.000 - 60.000 | 85 | 385 | 435 | 0,8% | 2,6% | 2,8% |
| 60.000 - 70.000 | 30 | 82 | 115 | 0,3% | 0,6% | 0,7% |
| 70.000 - 80.000 | 14 | 44 | 55 | 0,1% | 0,3% | 0,4% |
| 80.000 - 90.000 | 15 | 36 | 51 | 0,1% | 0,2% | 0,3% |
| 90.000 - 100.000 | 2 | 26 | 18 | 0,0% | 0,2% | 0,1% |
| 100.000 - | 17 | 35 | 54 | 0,2% | 0,2% | 0,3% |
| Tilsamans | 10.854 | 14.788 | 15.490 | 100,0% | 100,0% | 100,0% |

*Kelda: Hagstova Føroya*

Verður lønarsamsýningin hjá løgtingsfólkum samanborin við aðrar almennar lønir innan almennar tænastur, so svarar 34. lønarflokkur eftir lønartalvuni hjá tænastumannafelagnum til fulltrúar á 7. ári eftir sáttmálanum millum Fíggjarmálaráðið og Búskapar- og Løgfrøðingafelagið.

Til samanberingar kann nevnast, at borgarstjórar í føroysku kommunum, sum hava fleiri enn 1.500 íbúgvar, hava eina mánaðarløn upp á kr. 58.615 (lønarfl. 37) meðan borgarstjórar við millum 5.000 og 9.999 íbúgvum fáa kr. 63.604 (lønarfl. 38) í mánaðarløn, og borgarstjórar við fleiri enn 10.000

íbúgvum fáa kr.  68.046 (lønarfl. 39) í mánaðarløn. Hesir eru allir fulltíðarsettir borgarstjórar. Lønin verður ásett eftir lønarsáttmálanum hjá Felag Tænastumanna Landsins.

Deildarleiðarar í almennu fyrisitingini, sum eru løntir sambært sáttmálanum millum Fíggjarmálaráðið og Búskapar- og Løgfrøðingarfelagið fáa millum kr. 40.807 og kr. 51.049 í mánaðarløn. Støddin á lønini veldst um útbúgving, ábyrgd og royndir. Flestu alment settu starvsfólk fáa 15% í eftirløn.

Løgtingsforfólk eru lønt á sama hátt sum løgmaður. Tað er 130% av 40. lønarflokki hjá tænastumonnum landsins, svarandi til kr.  97.087 um mánaðin. Næstforfólkini í Løgtinginum verða samsýnt við vanligari tingfólkaløn umframt einum mánaðarískoyti upp á kr. 2.500 um mánaðin og fáa sostatt í alt kr. 48.874 um mánaðin.

Forfólkini í teimum føstu løgtingsnevndunum fáa tað sama sum næstforfólkini í Løgtinginum.

# 6 Viðgerð og tilmæli

## 6.1 Inngangur

Við støði í frammanfyri standandi gjøgnumgongd av verandi lønarlagi og skipanum í Føroyum og teimum Norðurlondum, sum vit hava samanborið við, verður í stuttum tikið samanum verandi skipan fyri hvørt øki sær. Síðani verður umrøtt, hvørt verandi skipan er hóskandi samanborið við samfelagsgongdina, síðani verandi skipan varð sett í gildi, eins og umrøtt verður um samfelagslig atlit og menningin á tilsvarandi økjum í Norðurlondunum tala fyri, at broytingar verða gjørdar.

At enda verða niðurstøða og tilmæli gjørd fyri einstøku økini.

## 6.2 Grundarlagið undir samsýningini til løgtingsfólk

Samsýningin til løgtingsfólk verður ásett við grundarlagi í lønartalvunum hjá tænastumonnum landsins. Hetta tryggjar, at lønarlagið hjá tingfólkum í stóran mun fylgir tí almenna lønarlagnum.

Núgaldandi lóg um samsýning og eftirløn løgtingsmanna kom í gildi í 1999. Við tí lógini fóru løgtingsfólk frá at verða samsýnt samsvarandi 17. lønarflokki í lønartalvuni fyri tænastumenn (kr. 16.067 pr. mánað) til at verða lønt samsvarandi 34. lønarflokki í lønartalvuni fyri tænastumenn (kr. 24.981 pr. mánað).

Grundgevingin fyri lønarhækkingini var sambært almennu viðmerkingunum til lógaruppskotið[19], at løgtingsarbeiðið var økt nógv. Hetta m.a. orsakað av:

- At lóggávuarbeiðið hjá løgtinginum var økt munandi
- At tað við nýggju stýrisskipanini varð gjørdur greiður skilnaður millum umsitingina (landsstýrið) og lóggávuvaldið (løgtingið)
- At løgtingsnevndirnar sostatt einki umsitingarvald høvdu longur
- At tað hevði við sær, at løgtingið ikki fekk tað innlit í umsitingarlig mál, sum tað hevði frammanundan

Mett varð, at løgtingsarbeiðið var økt so nógv, at løgtingsfólk máttu hava løgtingsarbeiðið sum eitt fulltíðarstarv ella í minsta lagi sum høvuðsstarv. Hetta kom tó ikki í lógartekstin. Løgtingsfólk skuldu tó framvegis hava loyvi at røkja helvtina av møguligum borgarligum starvi, meðan ongin avmarking skuldi verða fyri tingfólk í privatari vinnu. Eftir uppskotinum skuldi løgtingsforfólk verða samsýnt á sama hátt sum løgmaður, eins og viðkomandi skuldi leggja øll onnur størv frá sær.

Um vit samanbera við skipanirnar í grannalondum okkara, so hevur Grønland somu skipan, har samsýningin til landstingsfólk er tengd at lønartalvuni fyri tænastumenn. Í Danmark er serlig lóg galdandi fyri samsýning til fólkatingslimir[20], men upphæddirnar í lógini verða javnaðar á sama hátt

[19] Løgtingsmál 73/1998
[20] Lovbekendtgørelse nr. 392 af 26. april 2017 med de ændringer, der følger af lov nr. 493 af 22. maj 2017, lov nr. 708 af 8. juni 2017 og lov nr. 714 af 8. juni 2017

sum tænastumannalønirnar. Í Noregi var í lóg sett serlig lønarráð at taka sær av at viðgera og mæla til samsýningar til ting- og stjórnarfólk. Líknandi skipan var eisini í Íslandi, men varð avtikin í 2018.

Nevndin heldur, at skipanin, har lønarlagið hjá tænastumonnum er grundarlag undir lønarsamsýningini, er hóskandi og skilagóð. Nevndin heldur tó, at samsýningin og eftirlønin hjá tingfólkum eigur at verða endurskoðað við jøvnum millumbilum, eins og samsýningin og eftirlønin hjá landsstýrisfólkunum verður.

Nevndin mælir tí til, at lønartalvan hjá tænastumonnum landsins framvegis verður grundarlagið undir lønarsamsýningini til løgtingsfólk.

Nevndin mælir harumframt til, at lógin frá 2003 um nevnd at geva løgmanni tilmæli um samsýning og eftirløn landsstýrismanna v.m.[21] verður víðkað til eisini at umfata at geva løgtingsforfólkunum tilmæli um samsýning og eftirløn til løgtingsfólk v.m..

## 6.3 Lønarsamsýning til løgtingsfólk

Eftir galdandi lóg fær eitt vanligt løgtingsfólk samsýning samsvarandi 34. lønarflokki í lønartalvuni fyri tænastumenn, svarandi til kr. 556.488 um árið. Næstforfólk í tinginum og løgtingsfólk, sum eru nevndarforfólk, fáa kr. 30.000 afturat árligu samsýningini upp á kr. 556.488 tvs. íalt kr. 586.488 meðan løgtingsforfólkið fær eina samsýning, sum er 130% av 40. lønarflokki hjá tænastumonnunum, svarandi til kr. 1.165.044 um árið. Sí fylgiskjal 3.

Uppgávan hjá nevndini er at meta og koma við tilmæli um, hvør samsýning er hóskandi.

Av arbeiðssetninginum hjá nevndini framgongur, at nevndin í sínum tilmæli skal taka atlit at:

- Lønarlagnum í landinum yvirhøvur
- Teirri tign og ábyrgd, sum liggur í tingsessinum
- Hvussu tingfólk í grannalondum okkara verða lønt, og hvørjar sømdir tey annars hava
- Onnur viðkomandi viðurskifti

Nevndin metir, at hóast tað eru ávísar líkheitir millum tingfólkastarvið og onnur ábyrgdarfull størv, er tað trupult at finna onnur størv í føroyska samfelagnum, sum í síni heild, tá hugsað verður um ábyrgd, arbeiðsviðurskiftir, og at starvið er grundfest í fólkaræðinum, kunnu samanlíknast fult út við tað at vera tingfólk. Umráðandi er harumframt, at samsýningin til løgtingsfólk tekur hædd fyri ta umráðandi samfelagsligu uppgávuna, sum politikkarar lyfta í einum fólkaræði. Nevndin metir tó, at í mun til ta tign og ábyrgd, sum løgtingsfólk hava, og tá hædd verður tikin fyri umráðandi samfelagsligu uppgávuna, sum politikkarar lyfta í einum fólkaræði, at lønarlagið hjá løgtingsfólkum eigur at verða á hædd við tað hjá alment settum starvsfólkum við rímiliga stórari fakligari ábyrgd.

[21] http://www.logir.fo/Logtingslog/77-fra-06-05-2003-um-nevnd-at-geva-logmanni-tilmaeli-um-samsyningar-og-eftirlon-landsstyrismanna

Nevndin heldur tískil, at lønarlagið hjá løgtingsfólkum skal vera samsvarandi tí hjá fulltrúum í almennu umsitingini, sum hava lutfalsliga langa útbúgving og rímiliga høgan starvsaldur.

Tað skal í hesum sambandi viðmerkjast, at samanbering av beinleiðis lønarsamsýning hjá løgtingsfólkum við beinleiðis lønarsamsýning til aðrar samfelagsbólkar ikki gevur eina rættvísandi mynd, og tí má takast við ávísum fyrivarni. Nevndin metir t.d., at skattafría kostnaðarískoytið til løgtingsfólk kann metast sum lønarískoyti, tá tað í flestu førum má metast at verða hægri enn tær útreiðslur, ið tað er ætlað sum endurgjald fyri. Tað sama er galdandi fyri kostnaðarendurgjaldið.

Meðan eitt løgtingsfólk fær samsýning samsvarandi 34. lønarflokki hjá tænastumonnum (kr. 46.374 um mánaðin), fær eitt landsstýrisfólk samsýning, sum er 110% av 40. lønarflokki hjá tænastumonnum (kr. 82.117 um mánaðin), t.v.s. góðar 35.500 t.kr. meiri um mánaðin.

Kostnaðarendurgjaldið hjá løgtingsfólkum er roknað út frá 100 arbeiðsdøgum um árið, eins og loyvt er løgtingsfólkum at hava annað starv (tó bert ½ alment starv) við síðuna av løgtingssessinum. Kostnaðarendurgjaldið hjá landsstýrisfólkum er roknað út frá 200 arbeiðsdøgum um árið. Eitt landsstýrisfólk skal hinvegin sambært lógini um samsýning og eftirløn landsstýrismanna leggja øll onnur størv frá tær, eisini møgulig nevndarstørv[22].

Lutfallið millum ráðharralønir og tingfólkalønir í teimum Norðurlondum, sum vit hava samanborið við, liggur millum 1,36 og 1,91, verandi lutfall í Føroyum er 1,77, sí fylgiskjal 1.

Lønarsamsýningin til tingsfólk í teimum londum, sum vit hava samanborið við, er í flestu førum hægri enn lønarsamsýningin til løgtingsfólk í Føroyum. Somuleiðis er lønarsamsýningin til tingforfólk í teimum londum, sum vit hava samanborið við, í flestu førum hægri enn lønarsamsýningin til løgtingsforfólk í Føroyum. Kostnaðarískoytið í Grønlandi og í Danmark eru nógv hægri enn í Føroyum. Sí fylgiskjal 1.

Ein samanbering millum lond skal tó takast við ávísum fyrivarni, m.a. orsakað av, at keypiorkan og skattatrýstið eru ymisk í ymsu londunum, umframt at samanberingargrundarlagið ikki er eins, jb. viðmerkingina omanfyri um skattafrí endurgjøld, sum verða veitt í summum førum.

Við at hyggja at lønarlagnum í Føroyum fyri starvsfólk við rímiliga stórari fakligari ábyrgd og lønarlagnum hjá tinglimun í londunum, vit samanbera við, metir nevndin ikki, at samlaða samsýningin til løgtingsfólk eigur at hækka munandi. Tí løgtingsfólk fáa í dag tænastumannaeftirløn, eins og tey fáa skattafrítt kostnaðarískoyti.

Vit meta tó, at samlaða samsýningin til løgtingsfólk eigur at verða løgd um, soleiðis at lønarsamsýningin hækkar, farið verður yvir til somu pensjónsskipan, sum í dag er galdandi fyri landsstýrisfólk, samstundis sum tænastumannaeftirlønin dettur burtur, og skipanin við kostnaðarískoyti fellur burtur, jb. niðanfyri.

Við hesum verður skapt meiri gjøgnumskygni í samsýningini til løgtingsfólk, eins og fingin verður ein skipan, har tað ber til at samanbera við lønarlagið í samfelagnum annars, og sum gevur betri møguleika at javna í samsvari við gongdina í samfelagnum og grannalondunum. Harumframt er

[22] Løgmaður kann tó í serligum føri loyvi einum landsstýrisfólki at hava annað lønt starv við síðuna av landsstýrissessinum.

umráðandi at sleppa undan pensjónsskipanum, sum ikki eru í samsvari við tær pensjónsskipanir, ið eru ásettar at vera galdandi fyri flest onnur í føroyska samfelagnum.

Nevndin metir, at fyritreytirnar og grundgevingarnar, ið verandi skipan er bygd á, eru broyttar munandi. Somuleiðis metir nevndin ikki, at tað er skynsamt, at tað almenna við verandi skipan átekur sær kostnaðarmiklar framtíðarskyldur mótvegis borgarum, hvørs virðið ikki er gjøgnumskygt og kent, og har virðið ikki samsvarar við eftirlønarskipanir- og eftirlønarstøðið í samfelagnum annars.

Nevndin mælir til, at lønarsamsýningin til løgtingsfólk verður broytt soleiðis, at løgtingsfólk í framtíðini fáa samsýning ájavnt 36. lønarflokki hjá tænastumonnum landsins (kr. 53.058 um mánaðin).

Verður hetta gjørt, verður lutfallið millum landsstýrisfólkaløn og løgtingsfólkaløn 1,55, móti 1,77 í dag.

Samsýningin hækkar við hesum, í bruttotølum, úr umleið kr. 48.374 (tá er kostnaðarískoyti, sum er kr. 2.000.- og skattafrítt, roknað uppí) til kr. 53.058 um mánaðin. Verður hugt eftir nettoúrtøkuni í mun til verandi samsýning, er hon tó bert umleið kr. 1.325 hægri mánaðarliga í mun til verandi samsýning og kostnaðarískoyti, tí skatturin og onnur gjøld tá verða hægri, sí fylgiskjal 4.

Tað er trupult at siga, um talan samlað sæð er um eina hækking, tá hugt verður bæði eftir samsýning og pensjón. Tað veldst um tingfólkið, m.a. hvussu leingi tey hava vunnið sær pensjón eftir verandi skipan ella ikki.

Samsýningin og onnur gjøld hjá tingfólkum verða í dag goldin forút. Tað hevur nakrar praktiskar trupulleikar við sær, m.a tá løgtingsfólk fara í farloyvi. Tá er neyðugt at tey rinda útgoldnu samsýningina og onnur gjøld, sum eru goldin forút, aftur. Sama er galdandi fyri varalimir, sum fara í farloyvi.

Nevndin mælir til, at útgjaldingin av samsýningum v.m. til løgtingsfólk verður umløgd til at vera goldin afturút, frá tí degi tey eru vald, og at hetta verður galdandi fyri øll løgtingsfólk og varafólk eftir næsta løgtingsval.

## 6.4 Kostnaðarískoyti

Løgtingsfólk fáa í dag skattafrítt kostnaðarískoyti, áljóðandi kr. 2.000 um mánaðin, sum endurgjald fyri ávísar útreiðslur, ið standast av arbeiðinum. Kostnaðarískoytið verður útgoldið mánaðarliga saman við lønarsamsýningini.

Trupulleikin við kostnaðarískoytinum er eftir nevndarinnar tykki m.a., at tað ikki er í samsvari við krøvini til almennu fyrisitingina annars. Tá starvsfólk fáa endurgjald fyri útreiðslur, tey hava av starvinum, skal tað skjalprógvast og upplýsast, hvat upphæddin hevur verið nýtt til. Nevndin er greið yvir, at ein slík skipan er umsitingarliga tung, og fer møguliga at krevja fleiri starvsfólk í løgtingsumsitingini.

Í Grønlandi fáa landstingslimirnir eisini kostnaðarískoyti. Í Grønlandi er kostnaðarískoytið áljóðandi kr. 67.262 um árið, tvs. umleið kr. 5.600 um mánaðin. Kostnaðarískoytið er ikki skattskyldugt, um útreiðslurnar kunnu skjalprógvast. Altingslimir í Íslandi fáa endurgoldið móti kvittan, útreiðslur teirra í sambandi við starvið sum altingslimir, tó í mesta lagi við kr. 2.420 um mánaðin. Danskir fólkatingslimir fáa skattafrítt kostnaðarískoyti, áljóðandi kr. 5.904 um mánaðin, har útreiðslurnar ikki skulu skjalfestast[23]. Fyri fólkatingslimir úr Føroyum og Grønlandi er mánaðarliga kostnaðarískoytið kr. 7.872.

Nevndin er av tí fatan, at tað í mest møguligan mun skal farast burtur frá skattafríum endurgjøldum fyri ikki skjalprógvaðar útreiðslur, og at lønin í staðin skal hækkast til eitt meira hóskandi stig, sí omanfyri

Verandi kostnaðarískoyti var sum skilst serliga hugsað at vera fyri at gjalda fyri samskiftiskostnaðin og skrivstovuhald, sum stendst av løgtingsarbeiðnum. Í framtíðini fara løgtingsfólk at hava betri skrivstovuumstøður í løgtinginum, harumframt fáa løgtingsfólk bæði teldu og fartelefon, um hetta tilmæli verður fylgt. Mælt verður til, at Løgtingið teknar eitt virkishald til øll løgtingsfólkini, sostatt fara løgtingsfólk í framtíðini ikki at hava serstakar persónligar samskiftis- og skrivstovukostnaðir.

Nevndin mælir tí til, at skipanin við skattafríum kostnaðarískoyti verður strikað.

Um mett verður, at upphæddin, sum goldin verður til flokkarnar fyri skrivstovuhald v.m. er ov lág, ber til at hyggja at henni og møguliga at hækka hesa.

## 6.5 Kostnaðarendurgjald

Verandi skipan viðvíkjandi kostnaði fyri ferðing til og frá arbeiði er gjørd sum eitt skattafrítt kostnaðarendurgjald, ið verður veitt í mun til, hvar í landinum viðkomandi løgtingsfólk hevur býr í §1, stk. 3, í lógini um samsýning og eftirløn løgtingsmanna er soljóðandi;

*“Stk 3. Tingmaður, sum er valdur í øðrum valdømi enn Suðurstreymoy, men býr ella kann haldast at hava fast tilhald í Tórshavnar Kommunu, fær sum endurgjald fyri eykaútreiðslur í hesum sambandi samsýning smb. §1, stk. 2, pkt. a, b og c 50 ferðir árliga, roknað eftir miðaltalinum millum Tórshavn og stytstu og longstu farleið til pláss í valdøminum, har hann er valdur. Løgtingsins formanskapur tekur avgerð í ivamálum.”*

Endamálið við §1, stk. 3, í lógini er at geva forfólkunum heimild til at verja fyri, at tingfólk, sum, hóast tey í landsfólkayvirlitinum er skrásettur at búgva uttan fyri Tórshavn, í veruleikanum búgva í Tórshavn, ikki skal fáa kostnaðarendurgjald sambært §1, stk. 2, í lógini.

Nevndin mælir til, at ásetingin í §1, stk. 3, verður broytt, soleiðis at hon verður soljóðandi:
*“Stk 3. Tingmaður, sum í landsfólkayvirlitinum er skrásettur at hava bústað uttanfyri Suðurstreymoy, men kann haldast at hava fast tilhald í Tórshavnar Kommunu, fær sum endurgjald fyri eykaútreiðslur í hesum sambandi samsýning smb. §1, stk. 2, pkt. a, b og c 50 ferðir árliga, roknað eftir stytstu farleið millum Tórshavn og skrásetta bústaðin. Løgtingsins formanskapur tekur avgerð í ivamálum.”*

[23] Henda upphædd er pr.1. apríl 2023

Nevndin mælir ikki til, at aðrar broytingar verða gjørdar í reglunum viðvíkjandi kostnaðarendurgjaldinum.

## 6.6 Ferðaútreiðslur

Skipanin viðvíkjandi útreiðslum í sambandi við ferðing uttanlands í løgtingsørindum verður, sambært §1, stk. 6, í løgtingslóg um samsýning og eftirløn løgtingsmanna, veitt ferðaendurgjald og dag- og tímapeningur eftir somu reglum, sum eru galdandi fyri tænastumenn landsins.

## 6.7 Samskiftisútreiðslur

Skipanin viðvíkjandi útreiðslum til samskifti hjá løgtingsfólkum er í dag tann, at løgtingsfólk fáa útflýggjað hvør sína teldu til løgtingsarbeiðið og kostnaðarískoyti, sum partvís er til telefonhald.

Nevnast kann, at í londunum, vit hava samanborið okkum við, er skipanin fyri tað mesta tann, at latin verður telda og endurgjald fyri samskiftisútreiðslur.

Nevndin metir, at tað er umráðandi, at løgtingsfólk hava hóskandi arbeiðsamboð at nýta í sambandi við tingarbeiðið, og at ein telda og ein fartelefon nøkta tann tørvin.

Tað er í dag alt meira vanligt, nú ein fartelefon alt meira er eitt arbeiðsamboð, og ikki bert verður nýtt at ringja við og móttaka ella senda sms, at arbeiðspláss av ávísari støðd tekna vinnuhald hjá veitara og so útflýggja starvsfólkum sínum arbeiðsfartelefon, sum kann nýtast við ávísum avmarkingum.

<u>Nevndin mælir tí til</u>, at løgtingsfólk fáa telefon og telefonhald, sum Løgtingið rindar, meðan tey hava sæti á tingi. Av trygdaráum skal útflýggjaða fartelefonin ikki nýtast til privat samskifti um alnetið. Til slíkt skulu løgtingsfólk hava egna telefon.

<u>Nevndin mælir til</u>, at tað verða gjørdar nærri ásetingar um hesi viðurskifti í sambandi við, at løgtingsfólk fara í farloyvi ella ikki verða afturvald, tvs. undir hvørjum umstøðum evt. fartelda og fartelefon skulu handast aftur og telefonhaldið strikast.

## 6.8 Fráfaringarsamsýning (bíðiløn)

Eftir verandi skipan hava løgtingsfólk rætt til fráfaringarsamsýning í 1 mánað fyri hvørt árið, tey hava havt sess á løgtingi, tó í minsta lagi í 4 mánaðir og í mesta lagi í 6 mánaðir.

Varafólk, sum hava sæti í tinginum, tá nýval verður útskrivað, hava rætt til fráfaringarsamsýning eftir somu reglum sum onnur tingfólk.

Varafólk, sum fara úr tinginum áðrenn nýval, hava, óansæð hvussu leingi tey hava havt sæti á tingi, ikki rætt til fráfaringarsamsýning, sum skipanin er í dag.

Tá løgtingsforfólkið fer frá, fær viðkomandi fráfaringarsamsýning í 6 mánaðir.

Mótroknað verður ikki fyri aðra inntøku í fráfaringarsamsýningini.

Sum sæst í gjøgnumgongdini av skipanunum viðvíkjandi fráfaringarsamsýningini hjá tingfólkum í teimum Norðurlondum, vit hava samanborið við, er felags fyri hini londini, at onnur inntøka verður mótroknað heilt ella partvíst í fráfaringarsamsýningini.

Vísandi til, at grundarlag ikki tykist vera fyri, at fyrrverandi løgtingsfólk skulu fáa útgoldið fleiri lønir í senn, metir nevndin, at tað eigur at verða mótroknað í fráfaringarsamsýningini í teimum førum, at viðkomandi hevur aðra lønarinntøku í fráfaringartíðarskeiðinum, soleiðis at tað almenna bert skal gjalda munin upp til ásettu fráfaringarsamsýningina.

Nevndin dugir harumframt ikki at síggja nakra orsøk til, at løgtingsfólk skulu í minsta lagi hava 4 mánaðir fráfaringarsamsýning, tá tað almenna annars vanliga einans letur í minsta lagi 3 mánaðir fráfaringarsamsýning.

Nevndin mælir til, at skipanin verður broytt soleiðis, at løgtingsfólk, sum leggur frá sær, fær samsýning í 1 mánað fyri hvørt ár, viðkomandi hevur havt sæti á løgtingi, tó í minsta lagi 3 mánaðir og í mesta lagi 6 mánaðir.

Nevndin mælir til, at varafólk, sum hava havt sæti á tingi í meira enn seks mánaðir samanlagt í einum valskeiði, og framvegis sita á tingi 2 mánaðir áðrenn nýval, fáa fráfaringarsamsýning svarandi til 1 dag fyri hvørjar 8 dagar, viðkomandi hevur tikið sæti á tingi, tó í minsta lagi 1 mánað og í mesta lagi í 6 mánaðir.

Nevndin mælir til, at varafólk, sum hava havt sæti á tingi samanhangandi í eitt ár ella meiri, fáa, um tey missa sæti, fráfaringarsamsýning í 1 dag fyri hvørjar 8 dagar, viðkomandi hevur tikið sæti á tingi, tó í mesta lagi 6 mánaðir.

Nevndin mælir harumframt til, at treytirnar viðvíkjandi fráfaringarsamsýningini hjá løgtingsforfólkum verða tær somu sum tær viðvíkjandi fráfaringarsamsýningini hjá løgmanni, soleiðis, at viðurskifti hjá øllum verða sum hjá løgmanni. Mælt verður somuleiðis til, at lógin um samsýning og eftirløn landsstýrismanna v.m. verður broytt soleiðis, at løgtingsforfólkið í øllum lutum er javnsett við løgmann og ikki bara í mun til samsýning.

Nevndin mælir at enda til, at tað í framtíðini skal mótroknast í fráfaringarsamsýningini í teimum førum, har viðkomandi løgtingsfólk hevur aðra lønarinntøku í fráfaringartíðarskeiðinum.

## 6.9 Pensjónsviðurskifti

Eftir galdandi reglum hava løgtingsfólk rætt til eginpensjón, tá ið viðkomandi hevur havt sæti á løgtingi í minsta lagi í 1 ár tilsamans.

Pensjónin verður útgoldin, tá ið tingfólk fyllir 67 ár, um viðkomandi ikki framvegis hevur sæti á løgtingi. Í serligum føri kunnu løgtingsfólk fáa pensjón frá 60 ára aldri[24].

[24] Sbrt. §4, stk. 2 í løgtingslóg nr. 12 frá 18. februar 1999 um samsýning og eftirløn løgtingsmanna.

Hægsta eginpensjónin er 60% av pensjónsgevandi lønini í 34. lønarflokki, og verður henda veitt, tá ið løgtingsfólk hava havt sæti á tingi í 16 ár ella meira.

Varafólk fyri løgtingsfólk forvinnur sær í verandi skipan eftirlønaraldur frá tí degi, viðkomandi hevur fingið tingsins góðkenning, ella um viðkomandi tekur við seinni, so frá hesum degi, til viðkomandi fer frá.

Varafólk, sum tekur sæti á tingi fyri løgtingsfólk, sum er vorðið landsstýrisfólk, forvinnur sær rætt til eftirlønaraldur, eisini um viðkomandi fer í farloyvi.

Tá varafólk, sum hevur tikið sæti á tingi av aðrari orsøk enn fyri løgtingsfólk, sum er vorðin landsstýrisfólk, fær farloyvi úr tinginum, forvinnur varafólkið sær ikki eftirlønaraldur í farloyvistíðarskeiðnum.

Nevndin metir, at fyritreytirnar og grundgevingarnar, ið verandi skipan er bygd á, eru broyttar munandi. Somuleiðis metir nevndin ikki, at tað er skynsamt, at tað almenna við verandi skipan átekur sær kostnaðarmiklar framtíðarskyldur mótvegis borgarum, hvørs virði ikki er gjøgnumskygt og kent, og har virðið ikki samsvarar við pensjónsskipanir og pensjónsstøðið í samfelagnum annars.

Samfelagsliga er nógv broytt síðani pensjónsviðurskiftini hjá løgtingsfólkum á fyrsta sinni vórðu ásett við lóg. Tá var ikki so vanligt, at løgtingsfólk komu úr størvum við skipaðum pensjónsviðurskiftum og høvdu møguleika at fara aftur í hesi aftaná lokið skeið. Ein av grundgevingunum fyri at gera núgaldandi pensjónsskipanina hjá løgtingsfólkum var júst, at løgtingsarbeiðið tá varð mett sum eitt slag av lívsstarvi[25].

Um hugt verður at samansetingini av teimum løgtingsfólkum, sum í dag manna løgtingið, sæst, at fleiri koma úr størvum, sum tey kunnu taka við aftur aftaná lokna setu. Harnæst er ofta talan um størv, sum hava skipað pensjónsviðurskifti, antin sum tænastufólk, sambært sáttmála á almenna arbeiðsmarknaðinum ella sambært serstøkum (individuellum) sáttmálum. Í tráð við at fólk eru vorðin meira tilvitað um pensjónsviðurskifti, er tað alt meira vanligt, at pensjónsgjald er ein partur av lønarsamsýningini á arbeiðsmarknaðinum, og frá 1. januar 2014 skulu øll gjalda til egna pensjón sambært Løgtingslóg nr. 49 um eftirløn.

Nevndin metir tí, at tær fyritreytir og tær grundgevingar, ið verandi pensjónsskipan er grundað á, serliga rætturin at vinna fulla pensjón eftir 16 árum, ikki longur eru haldgóðar sum grundarlag fyri at halda fast við verandi skipan.

Um hugt verður eftir pensjónsskipanum hjá tingfólkum í londum, ið vit hava samanborið við, eru mestsum øll hini londini farin yvir til skipanir, har pensjónin á ein ella annan hátt verður goldin sum partur av samsýningini í pensjónsskipanum antin almennar ella privatar. Danmark er einasta land, sum framvegis hevur á leið somu pensjónsskipan til sínar tinglimir sum í Føroyum, men eisini í Danmark eru røddir frammi um at broyta hesa skipan, so hon líkist tí skipan, sum er alment galdandi har.

---

[25] Sí viðmerkingar til løgtingsmál nr. 25 frá 1992

Nevndin, sum lat úr hondum álit til løgmann um samsýning og eftirløn v.m. til landsstýrisfólk í 2013, spurdi seg fyri hjá Gjaldstovuni, sum hevur um hendi tænastumannaeftirlønir, um til bar at siga nakað um virðið av verandi eftirlønarskipan hjá landsstýris- og løgtingsfólkum, men ongin almenn útrokning var tá gjørd hesum viðvíkjandi.

Í tíðindasending tann 17. apríl 2018 í Kringvarpi Føroya kom tó fram, at mett verður, at landskassin hevur eina skyldu áljóðandi 5 mia.kr. í eftirlønum til teirra, sum hava verið tænastufólk, løgmenn, landsstýrisfólk og løgtingsfólk.

Síðani tá hevur Føroya Gjaldstova, í samstarvi við aktuar, roknað samlaðu eftirlønirnar hjá landskassanum til øll, ið fáa tænastumannaeftirløn. Í landsroknskapinum fyri 2022 er tænastumannaeftirlønarskyldan hjá landskassanum roknað til mió.kr. 4.163. Av hesum eru mió.kr. 292 til verandi og fyrrverandi løgtingsfólk.

Nevndin metir, at tað hevur stóran týdning, at pensjónsskipanin hjá løgtingsfólkum í framtíðini verður soleiðis, at tað ikki skal verða trupult at rokna út, hvussu stórar útreiðslur landið hevur til fyrrverandi løgtingsfólk, og at ikki fleiri útreiðslur leggjast aftrat.

Nevndin metir harumframt, at tað hevur við sær størri gjøgnumskygni og er í betri samsvari við restina av arbeiðsmarknaðinum, at løgtingsfólk vinna sær meira í samsýning, meðan tey eru virkin, í staðin fyri at fáa stóran part av samsýningini sum pensjón, tá tey eru farin frá.

Nevndin mælir tí til, at pensjónsskipanin verður broytt, soleiðis at farið verður frá verandi skipan við tænastufólkapensjón til eina skipan, har Løgtingið rindar 15% av lønarsamsýningini afturat í pensjónsgjaldi í eina góðkenda pensjónsskipan. Hetta skal vera galdandi bæði fyri løgtingsfólk og varafólk. Pensjónsaldurin skal vera tann sami, sum er galdandi sambært lóg um almannapensjónir o.a. Hetta er sama skipan, sum er galdandi fyri landsstýrisfólk, og mælt verður til, at skipanirnar hjá hesum báðum bólkunum í framtíðini í mest møguligan mun vera tær somu.

Tilmælið er grundað á eina samlaða meting av:

- At starvið sum løgtingsfolk (eftir 16 árum) ikki longur kann metast sum eitt lívsstarv
- At tað almenna við verandi pensjónsskipan átekur sær eina skyldu, sum ikki samsvarar við støðið á pensjónum á arbeiðsmarknaðinum annars
- At pensjón vanliga í dag verður ásett sum partur av og við støði í útgoldnu lønini
- At tað er umráðandi, at tað er gjøgnumskygni í útreiðslum landsins

Ein tílík pensjónsskipan fer eisini at flyta pensjónsskipanina fyri løgtingsfólk í Føroyum móti teimum skipanum, sum flestu londini, ið vit hava samanborið við, eru farin yvir til.

Nevndin mælir til, at nýggja pensjónsskipanin verður sett í gildi fyri øll tey, ið verða vald á løgting á næsta løgtingsvali. Ein skiftisskipan eigur at taka hædd fyri rættindum, sum fyrrverandi og núverandi løgtingsfólk og landsstýrisfólk, teirra hjúnafelagar og børn, sum landið hevur pensjónsskyldu yvirfyri, hava. Sí í hesum sambandi fylgiskjal 2, sum vísir skiftisskipan, sum er

galdandi fyri landsstýrisfólkini sambært løgtingslóg um samsýning og eftirløn landsstýrismanna v.m., sum seinast broytt við kunngerð nr. 108 frá 15. september 2015[26.]

Nevndin mælir til, at sama skiftisskipan, sum verður nýtt til landsstýrisfólk, verður nýtt til løgtingsfólk.

[26] Løgtingslóg um samsýning og eftirløn landsstýrismanna v.m., sum seinast broytt við kunngerð nr. 108 frá 15. september 2015

# Fylgiskjal 1

**Samsýning og eftirløn hjá tingfólkum og stjórnarfólkum - Samabering**

| | | Føroyar | Grønland | Ísland | Danmark | Noreg |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Samsýning; | | | | | | |
| | Stjórnarleiðari/løgm. | 97.087 | 94.201 | 105.069 | 143.200 | 102.327 |
| | Ráðharri/landsstýrisf. | 82.150 | 84.123 | 94.907 | 114.560 | 83.131 |
| | Tingforfólk | 97.087 | 94.201 | 121.140 | 138.740 | 102.327 |
| | Næstforfólk | 48.874 | | 80.416 | | 66.403 |
| | Nevndarforfólk | 48.784 | | 80.416 | | 62.325 |
| | Tingfólk | 46.374 | 44.154 | 69.927 | 61.662 | 58.248 |
| | Lutfallið millum tingfólk og ráðharrar | 1,77 | 1,91 | 1,36 | 1,86 | 1,43 |

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Eftirløn | | | | | | |
| | Arbeiðsgevari | 60% av mð. løn eftir 16 árum á tingi. 4,5% í 8 ár og 3% í 8 ár | 10,0% | 11,5% | Skipanin broyrr 1/6-2017 | 6,03% upp til 82. 122 NOK, síðani 24,13% |
| | Tingfólk | 0% | 5,0% | 4,0% | | |
| | Tingforfólk | 0% | | | Maks. 23.582 | |

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Kostnaðarískoyti, sum er skattafrítt | 2.000 kr/mð | Skjalprógv 5,804 kr./mð. | Móti kvittan, tó maks, 2,606 kr./mð. | 5.904 kr./mð. | Skulu skjal-prógvast |

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Kostnaðarendurgjald: | | | | | | |
| | Tingfólk | Flutning í 100 dagar | Ferða-útreiðslur | Ferða-útreiðslur | Ferða-útreiðslur | Ferða-útreiðslur |

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Fráfaringar-samsýning: | | | | | | |
| | Grundupphædd | 4 mð. Løn | 3 mð. Løn | 3 mð. Løn | 6 mð. Løn | 3 mð. Løn |
| | Eyka | Maks. 6 mð. løn. 1 mð. fyri hvørt ár á tingi | 1,5 mð. løn fyri hvørt ár. | 3 mð. fyri fleiri tingsetur | Maks. 24 mð. løn. (forfólk tó 36 mð.løn). Mótrokning, tó ikki fyri 6 mð, løn | Maks. 12 mð. løn. Tá skal arbeiðsloysi skjalprógvast |

## Fylgiskjal 2

Eftirlønargjaldsprosent

Ár í Landsstýrinum við tænastumannalíknandi eftirløn tvørturum og ár í Løgtinginum niðureftir.

| | 0 | 1 | 2 | 3 | 4 | 5 | 6 | 7 | 8 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 0 | 15 | 13 | 11 | 9 | 7 | 5 | 3 | 2 | 0 |
| 1 | 14 | 12 | 10 | 8 | 5 | 4 | 2 | 1 | |
| 2 | 13 | 11 | 9 | 7 | 4 | 3 | 1 | | |
| 3 | 12 | 10 | 8 | 5 | 3 | 2 | | | |
| 4 | 11 | 9 | 7 | 4 | 2 | | | | |
| 5 | 10 | 8 | 5 | 3 | 1 | | | | |
| 6 | 9 | 7 | 4 | 2 | | | | | |
| 7 | 8 | 5 | 3 | 1 | | | | | |
| 8 | 7 | 4 | 2 | | | | | | |
| 9 | 6 | 3 | 1 | | | | | | |
| 10 | 5 | 3 | | | | | | | |
| 11 | 4 | 2 | | | | | | | |
| 12 | 3 | 1 | | | | | | | |
| 13 | 3 | | | | | | | | |
| 14 | 2 | | | | | | | | |
| 15 | 1 | | | | | | | | |
| 16 | 0 | | | | | | | | |

# Fylgiskjal 3

## Felag Tænastumanna Landsins

**Lønartalva galdandi frá 1. oktober 2023 til 30. september 2024**

| Lønarflokkar | | | | | | | | | | | | | | Stig | Løn |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | | | | | | | | | | | | | | 1 | 23.560,07 |
| 2 | | | | | | | | | | | | | | 2 | 23.746,17 |
| 3 | | | | | | | | | | | | | | 3 | 24.045,73 |
| 4 | | | | | | | | | | | | | | 4 | 24.298,90 |
| 5 | 2 | | | | | | | | | | | | | 5 | 24.558,09 |
| 6 | 1 | 3 | | | | | | | | | | | | 6 | 24.824,21 |
| | 2 | 1 | 4 | | | | | | | | | | | 7 | 25.098,51 |
| | 3 | 2 | 1 | 5 | | | | | | | | | | 8 | 25.378,02 |
| | 4 | 3 | 2 | 1 | | | | | | | | | | 9 | 25.666,53 |
| | 5 | 4 | 3 | 2 | 6 | | | | | | | | | 10 | 25.961,84 |
| | 6 | 5 | 4 | 3 | 1 | 7 | | | | | | | | 11 | 26.264,95 |
| | | 6 | 5 | 4 | 2 | 1 | 8 | | | | | | | 12 | 26.577,14 |
| | | | 6 | 5 | 3 | 2 | 1 | 9 | | | | | | 13 | 26.896,61 |
| | | | | 6 | 4 | 3 | 2 | 1 | 10 | | | | | 14 | 27.224,64 |
| | | | | | 5 | 4 | 3 | 2 | 1 | 11 | | | | 15 | 27.571,86 |
| | | | | | | 5 | 4 | 3 | 2 | 1 | 12 | | | 16 | 27.907,89 |
| | | | | | | | 5 | 4 | 3 | 2 | 1 | 13 | | 17 | 28.263,28 |
| | | | | | | | | 5 | 4 | 3 | 2 | 1 | 14 | 18 | 28.627,92 |
| 15 | | | | | | | | | 5 | 4 | 3 | 2 | 1 | 19 | 29.002,51 |
| 1 | 16 | | | | | | | | | 5 | 4 | 3 | 2 | 20 | 29.387,27 |
| 2 | 1 | 17 | | | | | | | | | 5 | 4 | 3 | 21 | 29.782,32 |
| 3 | 2 | 1 | 18 | | | | | | | | | 5 | 4 | 22 | 30.188,04 |
| 4 | 3 | 2 | 1 | 19 | | | | | | | | | 5 | 23 | 30.786,11 |
| 5 | 4 | 3 | 2 | 1 | 20 | | | | | | | | | 24 | 31.398,21 |
| | 5 | 4 | 3 | 2 | 1 | 21 | | | | | | | | 25 | 31.652,87 |
| | | 5 | 4 | 3 | | 1 | 22 | | | | | | | 26 | 32.103,43 |
| | | | 5 | 4 | 2 | | 1 | | | | | | | 27 | 32.566,41 |
| | | | | 5 | | 2 | | 23 | | | | | | 28 | 33.221,58 |
| | | | | | 3 | | 2 | 1 | 24 | | | | | 29 | 33.651,13 |
| | | | | | | 3 | | | 1 | 25 | | | | 30 | 34.152,14 |
| | | | | | 4 | | 3 | 2 | | 1 | 26 | | | 31 | 34.697,53 |
| | | | | | | 4 | | | 2 | | 1 | 27 | | 32 | 35.256,98 |
| | | | | | | | 4 | 3 | | 2 | | 1 | | 33 | 35.799,63 |
| | | | | | | | | | 3 | | 2 | | | 34 | 36.357,20 |
| | | | | | | | | 4 | | 3 | | 2 | 28 | 35 | 37.050,96 |
| | | | | | | | | | 4 | | 3 | | 1 | 36 | 37.639,34 |
| 29 | | | | | | | | | | 4 | | 3 | | 37 | 38.243,53 |
| 1 | 30 | | | | | | | | | | 4 | | 2 | 38 | 38.863,47 |
| | 1 | 31 | | | | | | | | | | 4 | | 39 | 39.622,35 |
| 2 | | 1 | | | | | | | | | | | 3 | 40 | 40.296,02 |
| | 2 | | | | | | | | | | | | | 41 | 41.009,37 |
| 3 | | 2 | 32 | | | | | | | | | | | 42 | 41.699,63 |
| | 3 | | 1 | | | | | | | | | | | 43 | 42.395,56 |
| | | 3 | | | | | | | | | | | | 44 | 43.108,37 |
| | | | 2 | | | | | | | | | | | 45 | 43.835,68 |
| | | | | 33.1 | | | | | | | | | | 46 | 44.763,50 |
| | | | | | 34.1 | | | | | | | | | 47 | 46.373,69 |
| | | | | | | 35.1 | | | | | | | | 48 | 50.140,20 |
| | | | | | | | 36.1 | | | | | | | 49 | 53.058,39 |
| | | | | | | | | 37.1 | | | | | | 50 | 58.615,01 |
| | | | | | | | | | 38.1 | | | | | 51 | 63.604,47 |
| | | | | | | | | | | 39.1 | | | | 52 | 68.046,18 |
| | | | | | | | | | | | 40.1 | | | 53 | 74.682,27 |

| | |
|---|---|
| Fundarpeningur: | |
| styttri enn 3 tímar: (≤ 3) | 675 |
| millum 3 og 5 tímar: | 1.350 |
| longri enn 5 tímar: | 2.025 |
| Aðalstjóraviðbót: | 6.380 |
| § 11 stk. 2 viðbøtur: | |
| 1 | 3.516 |
| 2 | 3.880 |
| 3 | 4.244 |
| 4 | 4.668 |
| 5 | 5.032 |
| 6 | 5.456 |
| 7 | 5.820 |
| Vaktargjald1: | 31,39 |
| Vaktargjald2: | 62,76 |
| Hundaviðbót: | 2.821 |

**Fylgiskjal 4**

## Samanbering millum 34. og 36. lønarflokk

Roknað fyri Tórshavnar kommunu við kirkjuskatti í 2024

| | | | Lønarflokkur | |
|---|---|---|---|---|
| | | | 34. | 36. |
| Mánaðarløn | | | 46.373,69 | 53.058,39 |
| Ársløn | | | 556.484,28 | 636.700,68 |
| Skattskyldug inntøka | | | 556.400,00 | 636.700,00 |
| Skattur og kirkjuskattur | | | -199.690,00 | -235.704,00 |
| AM-gjald | 3,00% | | -16.692,00 | -19.101,00 |
| ALS-gjald | 0,80% | í mesta lagi -5.200,00 | -4.451,20 | -5.093,60 |
| Barsilsgjald | 0,86% | | -4.785,04 | -5.475,62 |
| Heilsutrygd: | | | | |
| Fast mánaðargjald | 175,00 | | -2.100,00 | -2.100,00 |
| %-gjald | 0,70% | | -3.894,80 | -4.456,90 |
| Kringvarpsgjald | 150,00 | | -1.800,00 | -1.800,00 |
| Skattur og lønargjøld tilsamans | | | -233.413,04 | -273.731,12 |
| Løn eftir skatt | | | 323.071,24 | 362.969,56 |
| Skattafrítt kostnaðarískoyti | | | 24.000,00 | 0,00 |
| Netto | | | 347.071,24 | 362.969,56 |
| Munur í nettoinntøkuni | | | | 15.898,32 |
| Munur pr. mð. | | | | 1.324,86 |
| Harafturat verður mælt til: | | | | |
| Telefon | | | - | + |
| Telefonhald | | | - | + |

# 7 Keldulisti

## 7.1 Lógartilfar

Løgtingslóg nr. 12 frá 18. februar 1999 um samsýning og eftirløn løgtingsmanna.

Løgtingsmál nr. 73/1998: uppskot til løgtingslóg um samsýning og eftirløn løgtingsmanna og Undirnevnd-arálit um samsýning løgtingsmanna.

Løgtingsmál nr. 26 frá 1992 um samsýning løgtingsmanna v.m.

## 7.2 Annað tilfar

Álit um samsýning og eftirløn v.m. til landsstýrismenn 2012.

Álit um samsýning og eftirløn v.m. til landsstýrismenn 2017.

Álit við tilmæli um samsýning og eftirløn til løgtingslimir 2018.

Løgtingsmál nr. 111/2018: Uppskot til samsýning og eftirløn løgtingsmanna

Rapport fra Vederlagskommissionen 2016.

Lønarhagtøl fyri november 2011 - 2022 frá Hagstovu Føroya.

## 7.3 Heimasíður

www.fmr.fo

www.logir.fo

www.logting.fo

www.ina.gl

www.lovgivning.gl

www.althingi.is

www.lsr.is

www.ft.dk

www.retsinfo.dk

www.modst.dk

www.lovdata.no

www.stortinget.no

www.akademikerne.no

www.spk.no

## 7.4 Samskifti

Løgtingsskrivstovan: Johnhard Klettheyggj, stjóri

Lønardeildin: Fíggjarmálaráðið

Føroya Gjaldstova

Hagstova Føroya

Felag Tænastumanna Landsins

Grønland: Heimastýrið í Grønlandi: Økonomi og Personalestyrelsen, Lønservice